| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>15. desember 2022 | Blað nr.: 1057 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 15. desember 2022 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 272/22 – 297/22

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Súsanna Olsen
Kristian Martin Skála

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Eyðna Justinussen
Bogi Jacobsen
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 272/22 | 22/07178-2 | Birgir Nielsen : Berst frá at møta á býráðsfundi 15. desember 2022 | 1060 |
| 273/22 | 22/07279-1 | Ruth Vang : Berst frá at møta á býráðsfundi 15 . desember 2022 | 1061 |
| 274/22 | 22/00011-1 | Mál beind í nevndir 2022 | 1062 |
| 275/22 | 22/06992-2 | Afturkeyp av óbygdum grundstykki. Matr.nr. 255ei, Kirkjubøur, Argir. | 1064 |
| 276/22 | 21/00399-13 | Matr.nr. 255by, Kirkjubøur-Argir. Eigari vil selja kommununi grundstykkið | 1066 |
| 277/22 | 22/05383-2 | Matr. nr. 135lt, Hoyvík. Eigarin biður um loyvi til at selja ognina. | 1068 |
| 278/22 | 22/05008-1 | Heiðurstekin Tórshavnar Býráðs | 1070 |
| 279/22 | 22/06065-1 | Flyting millum rakstrarstøð av játtan hjá Heilsu- og umsorganartænastuni | 1073 |
| 280/22 | 15/03761-9 | Veiðifelagið Byrsumúli : Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum. | 1075 |
| 281/22 | 19/04397-1 | Golfvøllur á Glyvursnesi - byggiverkætlan | 1092 |
| 282/22 | 18/01726-4 | Umstøðurnar kring tennisøkið í Gundadali | 1099 |
| 283/22 | 21/00581-2 | HB : Umsókn um íløgustuðul til umbyggingar í HB-húsinum | 1105 |
| 284/22 | 21/00888-5 | B36 : Umsókn um íløgustuðul til umvælingar v.m. í B36-húsinum | 1107 |
| 285/22 | 15/03409-23 | Müllers Pakkhús – nýtt gólv til miðhæddina (2. hædd) | 1109 |
| 286/22 | 22/05494-2 | Áheitan um at fáa nýggjan leigusáttmála til dynamittgoymsluna í Flatnahaga á Bøllureyni | 1111 |
| 287/22 | 22/01300-1 | Útskifting av maskinu til jarnplássið hjá Kommunalu Brennistøðini | 1114 |
| 288/22 | 22/02376-2 | Høli til frítíðarskúla og ungdómstilboð í Kaldbak | 1117 |
| 289/22 | 22/00463-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð | 1121 |
| 290/22 | 22/06945-1 | Varðveitingarverd øki og bygningar í kommununi | 1127 |
| 291/22 | 22/07015-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 807g, Tórshavn - Frá A1 til D3 | 1131 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 292/22 | 22/06962-1 | Persónsupplýsingarpolitikkur fyri borgarar og starvsfólk | 1133 |
| 293/22 | 22/06615-1 | Eykajáttan av meirinntøkum 2022 | 1136 |
| 294/22 | 22/01129-1 | Náttúruøki í Dalinum Langa | 1139 |
| 295/22 | 22/00009-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022 | 1143 |
| 296/22 | 22/06833-1 | Ásetan av fundardøgnum fyri býráðið 2023 | 1147 |
| 297/22 | 22/02807-2 | Avtalu millum Kommunalu Brennistøðina á Hjalla (KB) og Fjarhitafelagið (FHF) | 1148 |

**Til viðgerðar**

## 272/22 Birgir Nielsen : Berst frá at møta á býráðsfundi 15. desember 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 272/22 | 22/07178-2 |

**Málslýsing**
Birgir Nielsen hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Kristian Martin Skála, eru loknar.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 273/22 Ruth Vang : Berst frá at møta á býráðsfundi 15 . desember 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 273/22 | 22/07279-1 |

**Málslýsing**

Ruth Vang hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Súsanna Olsen, eru loknar.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 274/22 Mál beind í nevndir 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 3/22 | 22/00011-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 25/22 | 22/00011-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 55/22 | 22/00011-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 82/22 | 22/00011-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 108/22 | 22/00011-1 |
| 6 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 134/22 | 22/00011-1 |
| 7 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 178/22 | 22/00011-1 |
| 8 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 194/22 | 22/00011-1 |
| 9 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 228/22 | 22/00011-1 |
| 10 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 255/22 | 22/00011-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 274/22 | 22/00011-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri økir í kommununi** | **Fyri borgarar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið til eftirtektar**.**

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 275/22 Afturkeyp av óbygdum grundstykki. Matr.nr. 255ei, Kirkjubøur, Argir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 312/22 | 22/06992-2 |
| 2 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 275/22 | 22/06992-2 |

**Upprunin til málið:** Eigarar hava boðað frá, at tey ynskja at lata óbygda grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum**

Grundstykkið matr.nr. 255ei. Kirkjubøur,Argir. ( Útstykking Klingurstjørn 2 )
Vídd. 402m2. Skeytið tinglýst 11.06.2020.
Grundstykkið er grovplanerað og við øllum kommunalum tekniskum veitingum.

Sambært ásetingum í skeytinum, verður Tórshavnar kommuna hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í samband við afturskeytan, og rindar verandi eigari tí útreiðslurnar til tinglýsing av afturkeyps skeytinum.

Sambært skeytinum var keypsprísurin fyri stykkið kr. 685.410,00 men hava keyparar seinni fingið afturflutt eina regulering í keypsprísinum áljóðandi kr. 60.702,00 soleiðis at nettokeypsprísurin var kr. 624.708,00

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin. Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 200 um alment útboð av kommunalari ogn. Tinglýstir servituttir. Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

| | Býráðsfundur<br>15. desember 2022 | Blað nr.: 1065<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| 6175 | | Keyp og søla |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 624.708 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022 - 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri upprunaligan reguleraðan søluprís kr. 624.708,- og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð. Peningurin verður játtaður av konto 6175, keyp og søla.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

# 276/22 Matr.nr. 255by, Kirkjubøur-Argir. Eigari vil selja kommununi grundstykkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 308/22 | 21/00399-13 |
| 2 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 276/22 | 21/00399-13 |

**Upprunin til málið**
Eigararnir av matr. nr. 255by, Kirkjubøur-Argir (*Klingurstjørn 1*) hava í teldubrævi boðað frá, at tey ynskja at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 255by, í útstykkingini í Klingurstjørn 1.
Grundstykkið er grovplanerað. Vídd 401m$^2$.
Søluprísur er 595.886.
Skeytið er tinglýst 28.02.2018.

Sambært áseting í skeytinum, falla allar útreiðslur í sambandi við møguligari afturskeyting til seljara. Tórshavnar Kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Stykkið er óbygt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | Játtast á: | |
|---|---|---|

| | Býráðsfundur<br>15. desember 2022 | Blað nr.: 1067<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| Deild | Verk-ætlan | Navn |
|---|---|---|
| 6175 | | Keyp og søla |

| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
|---|---|---|---|
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 595.886 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022-2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla Býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri upprunaligan søluprís kr. 595.886,- og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð. Peningurin verður játtaður av konto 6175, keyp og søla.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

# 277/22 Matr. nr. 135lt, Hoyvík. Eigarin biður um loyvi til at selja ognina.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 307/22 | 22/05383-2 |
| 2 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 277/22 | 22/05383-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn um loyvi til at selja ognina á matr. nr. 135lt, Hoyvík

**Lýsing av málinum**
Eigarin keypti ognina matr. nr. 135lt, Hoyvík við tinglýstum skeyti tann 31.10.2005.

Hús er ábygd á grundstykkinum, men er hetta ikki liðug.

Eigarin upplýsir, at byggingin er komin væl áleiðis, men er ikki heilt liðug. Somuleiðis upplýsir eigarin, at hiti er á, at húsið eru lutvís bjálvað, og at innveggirnir eru settir upp.

Eigarin upplýsir somuleiðis, at hann ikki ætlar at fullfíggja byggingina av húsinum á ognini, og hann søkir tí Tórshavnar kommunu um loyvi til at selja húsið víðari í fríari sølu. Sí skjal nr. 22/05383-1.

**Lógir, ásetingar o.a.**
***Grein 6 í skeytinum***
Grein 6 í skeytinum ásetur, at keyparin hevur ikki loyvi til at selja stykkið víðari, fyrr enn sethús eru bygd á stykkinum. Átalurætt hevur Tórshavnar Kommuna.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur verið og gjørt eina húsaskoðan av bygdu húsinum. Vísast skal til skjal nr. 22/05383-7 í málinum.

Umsitingin hevur ikki havt nøkur serlig tól, tá húsaskoðanin bleiv gjørd. Tískil er húsaskoðanin ein leyslig meting av tí, sum er bygt.

Talan er um sethús á 1½ hædd við tveimum stórum kvistum.

Sethúsið eru innilokaði og liðug á útsíðuni. Tað manglar nógv at gera innan í húsinum. Útiveggir, tak, loft og gólv eru partvís bjálvað og við dampsperru. Øll vindeygu eru ísett. Fjarhitin er settur til. Kloakk er góðkend, tað manglar bert ein regnvatnsbrunnur í. Bilhús er ikki bygt.

Víðarisøla av ognini i fríari sølu krevur tilsøgn frá Tórshavnar kommunu.

Ein annar valmøguleiki er, at Tórshavnar kommuna krevur grundøkið innaftur, vísandi til at eigarin ikki ætlar at byggja húsini liðug. Tórshavnar kommuna skal tá sambært skeytisásetingum rinda endurgjald fyri tað sum er bygt á ognini. Tórshavnar kommuna hevði við hesi loysn samstundis tikið á seg tann váða, ið liggur í at yvirtaka ófullfíggjaða húsaognina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Vísandi til tann váða, ið liggur í at yvirtaka eina húsaogn, ið ikki er liðug og hevur fingið góðkenda byggiváttan, mæla kommunustjórin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at loyva eigaranum at selja ognina víðari í fríari sølu.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

# 278/22 Heiðurstekin Tórshavnar Býráðs

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 237/22 | 22/05008-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 198/22 | 22/05008-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 314/22 | 22/05008-1 |
| 4 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 278/22 | 22/05008-1 |

**Upprunin til málið**
Borgarstjórin

**Lýsing av málinum**
Eftir áheitan frá borgarstjóranum hevur umsitingin gjørt reglugerð um Heiðurstekin Tórshavnar Býráðs, ið er heiðurstekin, ið ætlandi skal latast starvsfólki, ið hava verið í tænastu hjá Tórshavnar kommunu í 30 og 40 ár umframt borgarum, ið hava sýnt serligt hegni ella hava laðað týðandi varðar eftir seg á lívsleiðini.

Starvsfólk fáa eftir 30 ára tænastu silvurheiðurstekin Tórshavnar býráðs, og eftir 40 ára tænastu verður gullheiðurstekin Tórshavnar býráðs latið. Teimum, sum í virki sínum á serligan hátt hava slóðað fyri og hava verið góðar fyrimyndir hjá øðrum, verður latið gullheiðurstekin Tórshavnar býráðs.

Borgaranum verður latið eitt heiðurstekin umframt eitt heiðursbræv, sum í stuttum lýsir, hví heiðurin verður latin.

Heiðursteknið er runt merki við búmerki Tórshavnar kommunu og við áskriftini *Heiðurstekin Tórshavnar Býráðs*. Heiðursteknið er knýtt í klædnastykki í hvítum, reyðum og bláum.

Tað er umsitingin, sum kemur at umsita reglugerðina um Heiðurstekin Tórshavnar Býráðs.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | X | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at góðkenna uppskotið til reglugerð um Heiðurstekin Tórshavnar Býráðs.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við reglugerðini, við tí broyting at reglugerðin eisini er galdandi fyri býráðslimir. Somuleiðis fáa borgarstjórar handað heiðursmerkið.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Borgarstjórin legði fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at serlig reglugerð verður gjørd fyri borgarar.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 blonkum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Kári Johansen, Kristianna Winther Poulsen, Tróndur Sigurðsson, Jákup Dam og Ruth Vang.

**Ískoyti:**

Vísandi til býráðssamtykt 29.september 2022, hevur umsitingin gjørt nýtt uppskot til eina reglugerð, sum fevnir um borgarstjóra, býráðslim, starvsfólk og borgara.

Upprunaliga uppskotið til reglugerð er dagført soleiðis, at reglugerðin nú eisini ásetir, at borgari, sum hevur gjørt eitt hvørt serstakt kommununi at gagni, kann fáa gullheiðurstekin, og heiðursbræv, sum lýsir, hví viðkomandi fær heiðursteknið.

Tað er ein nevnd, sum er sett saman við umboðum fyri meiriluta og minniluta í býráðnum og kommunustjóranum, sum ger av, hvør borgari skal hava heiðurstekin.

Nevndarlimur og navnnevndur persónur kann gera skrivligt tilmæli um, hvør skal hava heiðurstekin.

Í skrivliga tilmælinum skal í stuttum greiðast frá lívssøguni hjá borgaranum, og grundgevast skal fyri, hví mett verður, at borgarin skal hava heiðurstekin.

Nevndin tekur síðani avgerð um, hvørt heiðurstekin skal latast.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at góðkenna nýggja uppskotið til reglugerð um Heiðurstekin Tórshavnar býráðs.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

# 279/22 Flyting millum rakstrarstøð av játtan hjá Heilsu- og umsorganartænastuni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 15.11.2022 | 18/22 | 22/06065-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 277/22 | 22/06065-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 261/22 | 22/06065-1 |
| 4 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 279/22 | 22/06065-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

Framflutta minninýtslan hjá Heilsu- og umsorganartænastuni frá 2021 til 2022 var 8%. Nakað av peninginum var í framflytingini oyramerkt til onnur endamál á eldraøkinum, t.d. røkt, reingerðartænastuna o.a. Eisini var nakað oyramerkt til Naina og til rakstur av kommunulæknatænstuni.
5 nýggjar kommunulæknaviðtalur verða tiknar í nýtslu í Berjabrekku á sumri í 2023. Talan er um eina nýggja viðtalu og 4 verðandi viðtalur sum vera fluttar í nýggj hølir. Kommunan hevur skyldu at innrætta kommunulæknaviðtalur sambært Løgtingslóg um kommunulæknaskipan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 6. mai 2015.
Mett verður at tørvur er á 3.5 mio. kr. til at etablera 5 kommunulæknaviðtalur við innbúgv, tólum osv. Tó verður tað, sum er í verandi viðtalum, endurnýtt í tann mun tað ber til.
Møguligt er at fíggja etableringina av kommunulæknaviðtalum á 3.5 mio. av framfluttum peningini á stovnsnummar 2722 Tilboð.

Lágargarður er røktarheim við 48 búplássum. Lágargarður hevur virka í 35 ár og stórur tørvur er á at Lágargarður verður málaður innan. Møguligt er ikki hjá bygningsdeildini at gera hetta arbeiðið í ár. Heilsu- og umsorganartænastan hevur møguleika at nýta 700.000 kr. til hetta endamál av framfluttum peningi. Tí verður biði um at flyta 700.000 kr. av konto 2720 Heilsuhúsið til 6110 umsiting og røkt av bygningum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri økir í kommununi | Fyri økir samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>15. desember 2022 | Blað nr.: 1074<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Heilsu- og umsorganarstjórin og fíggjarfulltrúin mæla Heilsu- og eldranevndini til:

- At flyta 3.5 mio. av 2722 Tilboð til 2210 Kommunulæknatænastur projekt 22001 til etablering av nýggjum kommunulæknaviðtalum í Berjabrekku.
- At flyta 700.000 kr. av 2720 Heilsuhúsið á 6110 umsiting og røkt av bygningum projekt 61112 til innduramáling av felagsøkjum á Lágargarði.

At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 15. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 280/22 Veiðifelagið Byrsumúli : Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 108/17 | 15/03761-9 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 162/17 | 15/03761-9 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 234/17 | 15/03761-9 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 310/17 | 15/03761-9 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 85/18 | 15/03761-9 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 104/18 | 15/03761-9 |
| 7 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 159/18 | 15/03761-9 |
| 8 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 203/18 | 15/03761-9 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 178/18 | 15/03761-9 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 152/18 | 15/03761-9 |
| 11 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 270/18 | 15/03761-9 |
| 12 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 31/19 | 15/03761-9 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 26/19 | 15/03761-9 |
| 14 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 18/19 | 15/03761-9 |
| 15 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 98/19 | 15/03761-9 |
| 16 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.04.2019 | 13/19 | 15/03761-9 |
| 17 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 143/19 | 15/03761-9 |
| 18 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 278/19 | 15/03761-9 |
| 19 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 306/19 | 15/03761-9 |
| 20 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 268/19 | 15/03761-9 |
| 21 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 42/20 | 15/03761-9 |
| 22 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 43/20 | 15/03761-9 |
| 23 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 35/20 | 15/03761-9 |
| 24 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 96/20 | 15/03761-9 |
| 25 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 174/20 | 15/03761-9 |
| 26 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 169/20 | 15/03761-9 |
| 27 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 143/20 | 15/03761-9 |
| 28 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 226/20 | 15/03761-9 |
| 29 Mentamálanevndin | 26.10.2020 | 294/20 | 15/03761-9 |
| 30 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 284/20 | 15/03761-9 |
| 31 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 226/20 | 15/03761-9 |
| 32 Mentamálanevndin | 28.10.2020 | 296/20 | 15/03761-9 |
| 33 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 12/21 | 15/03761-9 |
| 34 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 95/21 | 15/03761-9 |
| 35 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 86/21 | 15/03761-9 |
| 36 Mentamálanevndin | 27.04.2021 | 106/21 | 15/03761-9 |
| 37 Fíggjarnevndin | 28.04.2021 | 100/21 | 15/03761-9 |
| 38 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 116/21 | 15/03761-9 |
| 39 Mentamálanevndin | 01.12.2021 | 283/21 | 15/03761-9 |
| 40 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 28/22 | 15/03761-9 |
| 41 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 32/22 | 15/03761-9 |
| 42 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 28/22 | 15/03761-9 |
| 43 Mentamálanevndin | 30.11.2022 | 228/22 | 15/03761-9 |
| 44 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 303/22 | 15/03761-9 |
| 45 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 280/22 | 15/03761-9 |

**Málslýsing:**
Veiðifelagið Byrsumúli sendi í 2015 áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa um at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum (sí hjáløgd skjøl). Síðani hevur verið nakað av samskifti millum kommununa og felagið.

4. apríl 2017 sendir felagið umsókn um stuðul til projektering av eini verkætlan at dagføra skjótibreytirnar.

Talan er um tilboð frá Sp/f HMP Consult

"Prísurin fyri at gera eitt projekt er 450.000,- umframt MVG.
Við í hesum er:

- Myndugleikaprojekt og projekt klárt til útbjóðing.
-

Í hesum er íroknað:

- Lendisprojekt við vegum og gøtum.
- Dekkgrót fram við fjørðuni.

Skal viðmerkja, at vanliga er neyðugt at gera simuleringar á Hydraulisk institut í DK, fyri at áseta stødd á dekkgroti og hvussu stórur verjugarðurin skal gerast.
Hettar er so ikki íroknað prísin og kostar hettar neyvan undir 100.000,- at fáa gjørt. Tað kunnu vit so venda aftur til, kanska "overkill" frá mínari síðu.

- Innbyggja skýli, smærri bygningar o.t. í samb. við skjótivøllin.
- Ljós fram við vegum og gøtum.
- Uppmáting av lendinum.
- Visualisering av verkætlanini.

Tit senda okkum mát og plasering av skýlum, lutum o.t.
Er nakað eg havi gloymt, so hoyri eg frá tykkum. Eg hugsaði at tit skuldu hava eina samlaða loysn frá okkum."

Í sambandi við at skjótibreytin bleiv gjørd í farnu øld og síðani hevur verið drúgt samskifti við ymiskar myndugleikar v.m. um viðurskiftini har.

Møgulig útbygging vil kunna viðføra at ymisk viðurskifti skulu takast uppaftur, herundir:

- atlit til friðing sbrt. lógini um náttúrufriðing: http://www.logir.fo/Logtingslog/48-fra-09-07-1970-um-natturufriding-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-110-fra-29
- atlit til landsvegalógina sbrt. lógini um landsvegir: http://www.logir.fo/Logtingslog/51-fra-25-07-1972-um-landsvegir-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-18-fra-8
- atlit til lógina um umhvørvisvernd: http://www.logir.fo/Logtingslog/134-fra-29-10-1988-um-umhvorvisvernd-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-128-fra-22

Í fall farið verður undir hesa tilgongd og herundir projektering er hóskandi at gera eina nærri avtalu við felagið um innihald og treytir í verkætlanini.
Samstundis er ivasamt um tað er skilagott at gera eina projektering áðrenn neyvari loyvi fyriliggja. Í sofall má eini meiri principiell tilgongd vera fyrst. Spurningurin er so eisini um tað er felagið ella kommunan sum skal standa fyri tí?

Ongin peningur avsettur til endamálið Konta 5365 - Stuðul til ítrótt rúmar ikki slíka játtan í verandi støðu.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at taka principiella støðu til um farast skal víðari við umsóknini
b). at taka støðu til møguliga raðfesting á fíggjarætlan 2018 ella seinni ella á eykajáttan.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Ein minniluti, Gunvør Balle og Marin Katrina Frýdal, tekur ikki støðu til tilmælini, men vil taka málið upp aftur á seinni fundi.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælunum.

**Tilmæli:**
Til tess at taka málið upp aftur mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til, at umsitingin saman við felagnum nágreinar verkætlanina við Sandvíkir, bæði í mun til neyðug myndugleikakrøv og verkseting sum grundarlag fyri seinni støðutakan til projektering, útboð og fígging.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Í summar hevur umsitingin havt samskifti við Býrsumúla um málið. Mett verður at mest hóskandi er at fyrireikingarnar av verkætlanini verða í tveimum stigum. Í fyrstu atløgu at fáa ment verkætlanina fram til

sonevnt skipanaruppskotsstig og við støði í tí fáa til vega dagførdar góðkenningar, áðrenn farið verður undir detailprojektering og myndugleikaverkætlan. Leysliga mett kann eitt slíkt fáast til vega fyri 150 tkr.

Í samskiftinum hevur kommunan eisini fingið avrit av góðkenningum fyri verandi skjótianlegg t.e.:
- góðkenning frá yvirfriðingarnevndini
- skjótiloyvi frá politinum
- umhvørvisgóðkenning

Viðv. viðurskifti í mun til lógina um landsvegir, so er tað samskifti ikki endaliga avklárað.

Ítøkiliga er hugsanin at gera eina samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av verkætlanini. Uppskot til avtalu kann ætlandi verða klárt til nevndarfundin í oktober. Tá tann tilgongdin er komin á mál ber til at projektera verkætlanina lidna og bjóða hana út.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at fáa heimild at gera samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av skipanaruppskoti fíggjað av rakstri kontu xxx.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Samtykt at umsitingin fer undir samskifti við Byrsumúla og aðrar áhugapartar innan skjóting fyri at kanna aðra møguliga staðseting og felags loysn við skjótibreyt. Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Við støði í samtyktini í mentamálanevndini frá 29. november 2017, varð fundur fyriskipaður við Byrsumúla, Veiði- og skjótifelagið, Ark. Kommando og løgregluna, har feløgini/eindirnar vóru biðin um at greiða frá sínum virksemi og staðsetingum. Umrøtt varð, um til ber at samantvinna fleiri áhugapartar innan skjóting á einum stað.

Tørvurin hjá ymsu áhugapørtunum innan skjóting er ymiskur. Byrsumúli hevur aðrar fortreytir enn hinir partarnir, sum heilt avgjørt kundu verið saman um eina felags loysn við skjótibreyt. Millum annað hevur rætningurin og sólargangurin stóran týdning fyri Byrsumúla, meðan hesi ongan týdning hava fyri hinar partarnar. Í verandi støðu er ikki nøkur eyðsæð staðseting eyðmerkt ella uppskot komin um framtíðar staðsetingar, har hesi feløgini/eindirnar kunnu savnast á einum stað.

Um hugt verður eftir økinum, matr. 139e, har Byrsumúli heldur til í dag, so hóskar staðsetingin avbera væl til teirra virksemi, og stuðlar økið undir fortreytunum, sum skulu til fyri at skapa góðar karmar til skjótingina hjá Byrsumúla. Tó skal hædd takast fyri, at breytirnar verða góðkendar av altjóða serfrøðingum fyri at skipa altjóða kappingar. Umframt at øll trygdarkrøv, fráleika- og fráboðanarkrøv verða lokin í mun til almenna ferðslu á landi og sigling fram við landi. Í Danmark er tað ”Politiets og Justitsministeriets skydebane inspektør”, sum tekur sær av slíkum málum.

Óljóð- og dálkingarstøðan eigur eisini verða endurskoðað aftaná seinastu umhvørvisgóðkenning, ið var í 2006. Skjótibreytir eru kap. 5 virkir, ið Umhvørvisstovan hjá landinum varðar av. Virksemið er broytt, har skotið verður sunnu- og halgidagar. Virksemið í økinum hevur aftaná 30 ár sett síni neiligu merki á annars serstaka vakra lendið í Sandvíkum.

Í dag liggur økið á markinum til útjaðaran av Havnini, og er økið náttúruvakurt við fjøru og fríum útsýni út á sjógv. Ídnaðarøkið á Hjalla er nærmasti granni og ber økið brá av nógvari ferðslu. Í nærmastu framtíð, tá tunnilin verður liðugur, fer økið at liggja mitt í einum knútapunkti, ið verður bindilið millum oyggjarnar við øktari ferðslu. Tá hugsað verður um rekreativ øki, so leita fólk vanliga burtur frá ferðslu og óljóði, tískil er í mun til býarskipanarlig viðurskifti einki til hindurs fyri, at Byrsumúli heldur fram á verandi øki. Umsitingin mælir tó til at fáa altjóða grundreglur og serkønan at meta um staðsetingina.

Byrsumúli hevur fleiri vitjandi, ið øll fáa ágóðan av hesum náttúruvakra øki, men samanborið við almenningin er talið á borgarum lítið í mun til um hetta lendið lá sum fríøki til almenningin.

Harafturat er ynski frá umsitingini, at Byrsumúli ikki ger seg inn á ræ ttina, ið liggur tætt upp at ynskta matrikli. Ræ ttin er áleið túsund ára gomul, men verður ikki brúkt longur orsakað av skjótivirkseminum og øðrum, hegning o.s.fr. Men ræ ttin er tó eitt mentanar- og siðsøguligt minni, ið er vert at varðveita.

Ynski er um at atlit verða tikin til fjøru, og at farið verður væl um náttúruna sum heild, bæði í sambandi við dálking og ovurnýtslu, men náttúruvakurleikin er ikki tann sami aftaná 30 ára virksemi, økið treingir til at ruddast og hampast sum heild. Stranga eftirlitið, sum sigst vera, er ikki sjónligt.

Onnur staðseting er á Glyvursnesi, at gera skjótibreyt í grótbrotinum á Glyvursnesi ella í økinum sunnanfyri, har er vítt lendi burturfrá fjølbygdum øki. Men henda staðseting er partur av heildaruppskotinum í sambandi við gerð av golfvølli á Glyvursnesi.

Treytirnar, sambært umhvørvisgóðkenning í máli nr. 61010-200300445-36 (skjal 1), *Góðkenningartreytir frá 4. juli 2006, frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni*, eiga at dagførast, og eftirkannast, um treytirnar eru hildnar seinastu 22 árini. Virksemið er munandi broytt hesi árini, t.d. er nógv tons av stálhøglum skotin út á økið.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at Byrsumúli heldur fram á økinum, har teir eru í dag, at øll loyvi verða dagførd, umhvørvisgóðkenning verður framd og altjóða ásetingar til kappingar verða hildnar og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Nevndin mælir til at Byrsumúli heldur fram á økinum, har teir eru í dag**.**

**Ískoyti**:
Síðani fundin í Byggi- og býarskipanarnevndini er komið uppskot frá Politinum og Arktiskt kommando um staðsetingar av skjótibreyt til teirra tørv. Sí hjálagt skriv.

Á løgukonto 5775 er játtan á 1.500 tkr, ið er ætlað til fyrireikingar v.m. í sambandi við ymiskar verkætlanir innan ítróttaanlegg, herundir skjóting. Kontan er ikki fult disponerað enn.

Mál um endurnýggjan av leigusáttmála við Byrsumúla um økið verður lagt fyri fíggjarnevndina í næstum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at geva umsitingini heimild til at gera uppskot til samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av skipanaruppskoti og koma aftur í nevnd við einum uppskoti.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Sambært umbøn frá nevndini, kemur umboð fyri nevndina í Byrsumúla á fundin at greiða frá um virksemi og um útbyggingarætlanir felagsins.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Umboð fyri nevndina í Byrsumúla greiddi frá virkseminum og um útbyggingarætlanir felagsins.

**Ískoyti:**
Nýggjur 25 ára leigusáttmálið verður ætlandi undirskrivaður. Sí skjal 15/03761-32.

Avtalað er, at kommunan letur gera seyðasmogu, og annars letur tilfarð til hegn og pelar v.m. leystliga mettur kostnaður í alt kr. 87.000,00 Upphæddin verður at rindað av konto 6275 ( vetrarfriðing ) Sí útrokning skjal 15/03761-42

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at gera nýggjan 25 ára leigusáttmála við leigaran, sí skjal 15/03761-32, og at rinda gerð av seyðasmogu umframt tilfarð til hegn,pelar v.m. áleið kr. 87.000,00 av konto 6275 ( Vetrarfriðing )

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í økinum í Sandvíkum eru atlit at taka til umhvørvi, frítíðarvirksemi, seyðahald o.a. Felagið hevur í dag nógv stríð av upprudding sambært galdandi umhvørvisgóðkenning. Sum liður í at menna verkætlanina og tryggja neyðug atlit, verður mett hóskandi saman við felagnum at fáa landslagsarkitekt at gera uppskot um skipan av øki og lendi. Mett verður neyðugt at seta kr. 100.000 av til endamálið av játtan ætla til smærri ítróttarverkætlanir, sí mál 18/03320.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við ætlanini og vísa til mál 18/03320 viðvikjandi játtan.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og tryggja, at atlit verða tikin til umhvørvið, fjøruna, gomlu rættina og møguleikan fyri almennum uppihaldi.

**Ískoyti:**
Uppskot um skipan av øki og lendi er nú tókt, sí hjáløgdu fílu, umframt at limirnir fáa handaða mappu á fundinum.

Málið kemur fyri í nevnd 13. februar 2019.

**Mentamálanevndin og byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Limirnir fingu handað tilfar.

**Ískoyti:**
**Samandráttur av skipanaruppskotinum**
Skipanaruppskotið fevnir um uppskot til nýtt skjótianlegg í Sandvíkum hjá Veiðufelagnum Byrsumúli. Tað hevur verið týdningarmikið í sambandi við gerð av skipanaruppskotinum, at anleggið (skjótibreytin við tilhoyrandi viðurskiftum) hóskar inn í lendið og náttúruna kring økið. Harumframt hevur tað verið týdningarmikið, at nýggja anleggið er vakurt á at líta, er vælvirkandi og nútímans við fleiri virkismøguleikum og skjótibreytum.

Tað sum eyðmerkir uppskotið er, at serlig atlit eru tikið fyri uppruddingar arbeiðinum í sambandi við skjóting. Breytirnar vera fluttar longur frá fjøruni, lendið verður drenað og slættað so gjørligt verður at skipa ruddingina betur.

Ein vallgarður er teknaður at liggja á markinum millum anleggið og fjøruna, hann skal forða splintrum frá leirdúgvunum í at enda í fjøruni. Somuleiðis skal vallgarðurin tryggja, at tað framvegis verður atkomuligt hjá almenninginum til fjøruna. Men upplýsast skal, at tá anleggið er í brúk, tá verður ikki møguligt at nýta fjøruna til uppihald.

Anleggið skal vera fyri øll, tí eru atkomuviðurskiftini fyri rørslutarnað raðfest høgt. Hetta verður gjørt við at ein gøta kemur at leggja seg gjøgnum lendið og virka sum bindiligur millum felagshúsið við yvirdekkaðum hátúni, áskoðaraskýlið og skjótistøðini.

Í dag hevur Byrsumúli eitt felagshús, sum er gjørt av tveimum bingjum, men í skipanaruppskotinum er lagt upp til, at eitt felagshús verður gjørt við øllum hentleikum, so sum hølum/umstøðum til innivist, smærri móttøkur, veitslur, vesir o.a. hugsanin er, at sjálvt felagshúsið er uppbygt sera einkult, bygningsgrindin verður gjørd í pørtum, ið skjótt kunnu setast upp.

Yvirhøvur er tilfarsvalið sera einkult við timbri og flagtekju, sum hóskar væl til umhvørvið og náttúruna.

Vallgarðurin og ymisk skot á gøtuni vera prýdd við stórum gróti og vøkstri, ið somuleiðis hóskar væl til lendið og umhvørvið.

Aftrat hesum kemur ein eyrvegur at liggja aftanfyri anleggið, ið skal nýtast í sambandi við rakstur. Hesin skal flætta natúrliga inn í umhvørvið. Framvið eyrvegnum verður grót og runnar, hjálpirót og onnur planta, ið hóskar til umhvørvið.

**Góðkenning til altjóða kappingar:**
Fyrispurningar hava verið um viðurskiftini viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Veiðifelagið Byrsumúli hevur greitt frá hesum viðurskiftunum í skrivið til kommuna,
*sí skjal Svar vidvíkjandi krøvum til skjótibreytir.*

Fyrst er at viðmerkja, at eingin altjóða felagsskapur góðkennir nakra skjótibreyt yvirhøvur, hvørki her ella aðra staðni. Góðkenningarnar koma frá lokalum myndugleikum í mun til teirra lógarkrøv um trygd og umhvørvi v.m., meðan ítróttarligu reglurnar um kappingarnar eru ásettar av ISSF.

Ítróttarlig krøv: Ásetingar fyri mát/stødd á breyt, longd/ferð og vinklar, hvussu dúgvurnar skulu flúgva o.s.fr. eru at finna í kappingarreglunum frá ISSF. Sí skjal *ISSF reglur um skjótibreytir.* Skipanaruppskotið er í tráð við hesar ásetingarnar. Harumframt vendir økið rætt í mun til ljósviðurskiftini, sum ISSF mælir til, og veðurlagið á staðnum er tað besta, sum felagið kann ynskja sær.

Tað er kappingarleiðslan til einstøku kappingina, sum góðkennir ''breytina'', og tað snýr seg um, hvørt kastimaskinurnar eru innstillaðar rætt í mun til ítróttargreinina, til dømis OL-trap og OL-skeet.

Tá tað kemur til umstøðurnar rundan um breytina; felagshús, vesir o.a. er ikki talan um ítróttarlig krøv, tó sum liður í verkætlanin skulu hesi viðurskiftir; felagshús, vesir o.a. vera á nøktandi støði eftir BK17. Harumframt er tað ynski hjá kommununi, at nøktandi athølir/umstøður eru funktionel til virksemið.

Trygdarkrøv: Tað er løgreglan, sum góðkennir trygdina, her er talan um trygdarfrástøðu og hvønn veg skotið verður. Verandi breyt er góðkend, og skal nýggja breytin somuleiðis góðkennast, tá hendan er liðug.

Umhvørviskrøv: Umhvørvisstovan umsitur Umhvørvisgóðkenningina fyri virksemið á breytini. Somuleiðis er verandi breyt góðkend. Skipanaruppskotið leggur upp til, at virksemið tekur enn størri hædd fyri umhvørvinum.

Nevnast skal at Veiðifelagið Byrsumúli hevur sett seg í samband við Danmarks Jægerforbund. Og fingið tey at meta um skipanaruppskortið viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Danmarks Jægerforbund er av tí fatan, at nýggja skjótibreytin lkur allar treytir, ið eru galdandi til kappingar í OL-trap og OL-skeet. Sí skjal *190204 DJ skrivelse/MLMAL.*

Umsitingin hevur sett seg í samband við Skjótisamband Føroya við fyrispurning um viðurskiftini viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Skjótisamband Føroya hevur kanna skipanaruppskoti og greitt frá í skrivið til kommuna, sí skjal *Svar til Tórshavnar kommunu.*

Sagt verður at uppskotið um nýggja breyt lýkur allar treytir til heimligar kappingar eins væl og hon lýkur treytirnar til einar komandi oyggjaleikir. Breytin kemur sjalvsagt ongantíð at rúma heimmeistarakappingar ella Olympisku leikunum, men við einari OL-trap breyt og tveimum OL-skeet breytum, kunnu flest allar aljtóða og millumtjóðakappingar um okkara leiðir haldast her.

Verður hugt at møguligum framtíðarkrøvum til kappingar, so bendir einki á at møgulig broyting í reglunum fyri kappingargreinarnar skuldi viðført, at broytingar skulu gerast á sjálva breytina, so hon ikki kann nýtast longur. Áður, tá ið broytingar hava verið so hevur tað snúð seg um ferð og vinklar á dúgvunum viðvikjandi kastimaskinunum og ikki sjálvari breytini.

Í sambandi við oyggjaleikir so við breytin kunna rúma, OL.trap, Automatic Ball Trap og OL-skeet, eins væl og ovara skeet breytin í uppskotinum kann brúkast til Compak-Sporting-breyt. Til tað síðst krevst tó, at fleiri kastimaskinur verða settar upp, men hetta rúmar breytin væl.

Sjótisamband Føroya metir tí, at uppskotið uppá nýggja breyt vil tryggja skjótiítróttin í Føroyum í mong ár.

**Átøk í verkætlanini:**
Skipanaruppskotið leggur upp til, at anleggið kann skipast í pørtum. Ynskiligt hjá felagnum er, at skjótibreytirnar verða gjørdar sum tað fyrsta, soleiðis at uppruddingin gerst meiri lagalig. Síðani skulu vollarnir gerast, umframt gøtur og felagshús.

**Víðari fyrireikingar**
Í sambandi við viðgerð í mentamálanevndini kemur umsitingin at gera ítøkiligt tilmæli um, hvussu farast kann fram í mun til møguliga víðari fyrireikingar, herundir projektering, samstarvið við felagið, kostnaðarmetingar, fígging v.m.

**Skjøl:**
*- Journal nr. 15-03761-55 BYRSUMÚLI SKIPANARUPPSKOT DES.2018*
*- Journal nr. 15-03761-58 Svar vidvíkjandi krøvum til skjótibreytir*
*- Journal nr. 15-03761-58 ISSF reglur um skjótibreytir*
*- Journal nr. 15-03761-60 190204 DJ skrivelse/MLMAL*
*- Journal nr. 15/03761-61 Svar til Tórshavnar kommunu*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini til, at skipanaruppskotið verður samtykt sum ætlan fyri økið/virksemið, at øll loyvi og myndugleikakrøv verða dagførd, nú skjótibreytin verður endurnýggjað, og at beina málið í mentamálanevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina, teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Við støði í skipanaruppskotinum er nú klárt at fyrireika verkætlanina víðari saman við Veiðifelagnum Byrsumúla. Fyrsta stig er at fáa í lag avtalu við ráðgevarafelag um projektering av lendisarbeiðinum.

Til ber at projektera verkætlanina í einum ella í stigum, har sjálvt lendisarbeiðið eisini tekur atlit til, at felagið kann halda fram við venjingum í arbeiðstíðarskeiðnum. Á fundinum verður greitt frá viðurskiftum kring kostnað vm. í sambandi við projektering av slíkum anleggi/lendi og bygningum.

Mett verður hóskandi at seta av 300 tkr. í fyrstu atløgu til víðari tilgongdina. Sí tilmæli í máli 19/00144 Játtan í 2019 til smærri ítróttaanlegg.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja, at farið verður í tilgongd at bjóða út ráðgeving um projektering av skjótibreytini at leggja aftur fyri nevndina.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina 13. februar 2019.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at gera samstarvsavtalu við Veiðifelagið Byrsumúla um víðarimenning av verkætlanini og at bjóða út ráðgeving um projektering av skjótibreytini, at leggja aftur fyri nevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at samstarvsavtalan eisini umfatar regluliga rudding.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samráðingum við Veiðifelagið Byrsumúla um samstarvsaavtalu.

Umsitingin hevur eisini mett um, hvør leistur er tann frægasti í mun til at fáa projektera og útint verkætlanina. Mett verður at mest átroðkandi er at fáa drenað skjótiøkið og fáa gjørt vøllgarðarnar. Í fyrsta lagi tí at tað verður tað sum gerð mest mun at vera framt fyrst og í øðrum lagi at avmarkað kostnaðin til hetta fyrsta verkætlanarstigið.

Viðv. framferðarhátti kann veljast millum:

a). Projektera verkætlanina og síðani fara í útboð
Fyrimunurin er at ymsar møguligar óvissur vera færri og tað fæst eitt gott tilfar til grund fyri útboðnum av lendisarbeiðinum.

b). Bjóða arbeiðið út sum eina heildararbeiðstøku
Høvuðsfyrimunurin er at arbeiðið helst verður lǽttari at laga til og innan fyri ásettan kostnaðarrammu. Tó er neyðugt við nakað av nøgdarmetinginum áðrenn farið verður undir útboð so tað er nøkulunda greitt hvørjar nøgdir talan er um so skulu flytast, herundir gera nakrar kanningar viðv. dýpinum av tilfari í økinum. Hetta er mett til nakrar 10 tkr. og kann dekkast av kontu 5365 Stuðul til løgur.

Kostnaðarmeting
Í verandi støðu er ikki nøkur dagført kostnaðarmeting. Talan er um verkætlan, ið helst kostar fleiri mio.kr. Felagið bjóðar seg fram til at gera arbeiðir við bygningar, pallar o.a. meðan lendisarbeiðið sum heild krevur arbeiðstakara við røttu amboðunum og royndunum.

Fígging
Byrsumúli hevur ikki nakra fíggjarogn av týdningi og sum munar í hesum føri. Kommunan hevur ikki tøka fígging til verkætlanina í ár og tí má støða takast til um fígging skal setast av í løguætlanini fyri 2020 ella 2021.

Felagið bjóðar seg hinvegin at gera sjálvboðið arbeiðið innan onnur viðurskifti enn grót og moldarbeiðið og kann tað so innganga sum egininnsatsur.

Skotið verður upp at felagið og TK í næstum fara undir fyrireikingar til at søkja uttanhýsis stuðul til verkætlanina ella partar av henni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a). Um verkætlanin í fyrsta umfarið verður avmarkað til at drena skjótiøkið og gera vøllgarðar.

b). Um antin at projektera verkætlanina og síðani fara í útboð ella at bjóða arbeiðið út sum heildararbeiðstøku.

c). Við støði í valinum av pkt. a og b. at fara undir endaligar samráðingar um eina samstarvsavtalu at leggja fyri nevndina aftur.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt ikki at taka undir við tilmælinum. Nevndin staðfestir, at játtan ikki er tøk í ár og at málið verður tikið upp í sambandi við fíggjarætlanar-arbeiðið og langtíðarløguætlanina.

**Ískoyti:**
Við atliti til at fáa betri grundarlag fyri møguligari verkætlan og útbjóðing verður mett hóskandi at fáa gjørt ymiskar fyrireikingar, herundir:

Við støði í skipanaruppskotinum at:
1. Søkja um loyvi hjá friðingarmyndugleikunum til verkætlanina
2. Søkja um nýggja umhvørvisgóðkenning

Umframt:
3. Fáa gjørt lendis- og jørðkanningar, uppmátingar og avseting av verkætlanarøkinum fyri m.a. at fáa metingar um nøgdir av tilfari, ið skal flytast og útvegast og herundir kostnaðarmeting.
4. Fáa gjørt samstarvsavtalu við Byrsumúla um verkætlanina, herundir egininnsatsin hjá Byrsumúla og ætlan um at søkja um uttanhýsis fígging.

Fyribils verður mett, at pkt. 3 kostar 100 tkr. Mett verður at fígging til endamálið kann útvegast av upphæddini, ið var játtað til konto 5717 Ítróttaanlegg til fyribils bingjuloysn við Hoyvíksvøll (mál 18/00009), ein verkætlanin, ið ikki er útlit fyri at útinna í ár. Ætlanin er at fáa ráðgeva til kanningarnar.

Tíðarætlan:
Mett verður, at tilgongdin viðv. pkt. 1-4 tekur nakrar mánaðir og at eitt útboð helst kann vera í 2020, treytað av neyðugum loyvum og fígging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at fáa til vega uppskot til ráðgevaraavtalu um fyrireikingar til at bjóða út arbeiðstøku uppá drening, planering og gerð av vøllgarðum til nýggja skjótibreyt, herundir neyðug loyvi.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Jákup Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Eftir viðgerðina seinast er fíggjarætlanin fyri 2020 samtykt, umframt at tað í langtíðaríløguætlanini er lagt upp til fígging til skjótibreyt hjá Byrsumúla í 2021 og 2022.

Á løgukontu 5775 eru fyri fíggjarárið 2020 játtaðar 3.000 tkr. til skjótibreyt, t.e. játtanin skal brúkast til at byggja skjótibreyt, herímillum drening og vøllgarðar at verja fjøruna, umframt ætlaðar 4.000 tkr. til 2021 og 1.000 tkr. til 2022.

Við hesum ber sannlíkt til at fara undir at fyrireika og byggja nýggja skjótibreyt í Sandvíkum, ið nýtast kann til venjing, frálæru og altjóða kappingar.

Ætlanin er at gera avtalu við felagið, ið gjørdi skitsuprojektið at standa fyri liðugt projektering og útboðnum av verkætlanini.

Tilgongdin við at fáa neyðug loyvi til vega og tekur væntandi nakrar mánaðir.

Málið er at arbeiðið kann vera klárt at bjóða út í vár, tá neyðug loyvi væntandi eru fingin til vega, og fara undir útinning í summar. Byggiarbeiðið í lendinum væntast at ganga inn í 2021.

Forkanningar viðv. lendinum byrja í næstum og er dialogur í gongd við felagið um samstarvsavtalu. Ætlandi verða úrslitini av forkanningunum, uppskot til samstarvsavtalu og ráðgevaraavtala klár til fundin í nevndini 11. mars 2020.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at fara undir samráðingar um ráðgevaraavtalu.
b). at flyta 3.000 tkr av løgukarminum konta 5775 á nýggja projektkontu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Viðv. samstarvsavtalu
Umsitingin hevur verið í samráðingum við Veiðifelagið Byrsumúla um eina samstarvsavtalu og eru komin ásamt um eina avtalu. Sí hjálagt uppskot.

Viðv. umsóknum um loyvir
Tilgongd at fáa neyðug loyvi er í gongd.

Roknað verður við at svar fyriliggja frá øllum myndugleikum innan mai 2020.

Viðv. forkanningum av lendinum
Tær eru ikki byrjaðar enn, men verður tað væntandi í apríl-mai 2020.

Viðv. ráðgevaraavtalu
Samráðingar eru ávegis og væntast eitt úrslit at fyriliggja í mai 2020.

Alt eftir hvussu tað gongur við ymsu loyvunum og forkanningunum er málið at kunnu bjóða arbeiðstøkuna út í juni 2020. Væntandi verður talan um innbodna lisiatión.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at innganga hjáløgdu samstarvsavtalu við Veiðifelagið Byrsumúla. Málið verður beint í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Loyvisviðurskifti
Tilgongdin er væl ávegis og verður vónandi komið á mál við tí í summar.

Forkanningar
Sum liður í at fáa neyvari nøgdarmetingar viðv. økinum hevur Sp/f Munin gjørt sonevndar GEO-kanningar. Frágreiðingin verður væntandi tøk í viku 24.

Ráðgevaraavtala
Við støði í forkanningunum vera í juni samráðingar við Osbjørn Jacobsen/Henning Larsen, Føroya deild um ráðgevaraavtalu.

Útbjóðing
Ætlandi verður arbeiðið boðið út í innbodnari lisitatión so skjótt viðurskiftini omanfyri eru klár. Ætlandi kann arbeiðið byrja í heyst.

Teknisk útgerð
Felagið hevur søkt um at kunna fáa stuðul til at endurnýggja teknisku leirdúgvuskjótiútgerðina. Felagið hevur heintað inn tilboð, ið ljóðar uppá 175 tkr., felagið ynskir ein stuðul á 175 tkr.. Felagið kemur at gera ein egininnsats við niðurtøku av verandi útgerð og uppsetan av teirri nýggju mett til 30 tímar.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta felagnum 175 tkr. í stuðli til kastiútgerð at rinda av løgukontu L57033.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Verkætlanin hevur nú fingið umhvørvisgóðkenning frá Umhvørvisstovuni, umframt at Yvirfriðingarnevndin júst hevur staðfest avgerðina hjá friðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu.

Í summar eru gjørdar lendiskanningar, umframt at gjørdar eru innleiðandi kostnaðarmetingar. Sí hjáløgd skjøl.

Eftir er nú at fáa gjørt ráðgevaraavtalu um projektering og eftirlit við verkætlanini, umframt manglar eisini endalig avkláring við Landsverk um viðurskifti í mun til landsvegalógina og at fáa endaligt byggiloyvi frá byggivaldinum. Málið er at verkætlanin kann fara í útboð í okt. 2020.

Í vár samtykti býráðið at gera samstarvsavtalu við Veiðifelagið Byrsumúla og verður henda undirskrivað ein av komandi døgunum.

Á fundinum greiðir umsitingin nærri frá gongdini higartil, herundir lendiskanningini v.m.

Veiðifelagið Byrsumúli er farin undir útvegan av kastiútgerðini, ið felagið fekk stuðul til fyrr í ár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Umrøtt. Nevndin samtykti at seta ein politiskan samstarvsbólk, har andstøða og samgonga velja hvør sítt umboð, at fylgja við útinnanini av arbeiðnum.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 26. oktober 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í samráðingum við ráðgevarafelagið Henning Larsen (deildina í Føroyum) um avtalu um tekniska ráðgeving viðvíkjandi lendisarbeiðinum og ávísum innstallatiónum til skjótibreyt til Veiðifelagið Byrsumúla í Sandvíkum. HMP Consult er undirráðgevi. Semja er við feløgini um at avrokna ráðgevaraarbeiðið eftir brúktum tímum og gera tað upp regluliga. Higartil eru brúktir 160 tímar.

Tilgongdin og vavið av verkætlanini, er viðgjørt og avstemmað við Veiðifelagið Byrsumúla.

Um farið verður undir projektering í november 2020 kann roknast við at útboð av verkætlanini kann vera um 2-3 mánaðir og arbeiðið fara í gongd í fyrsta ársfjórðingi 2021.

**Kostnaðarmeting**
Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá metingum viðv. heildarkostnaðinum fyri verkætlanina, bæði ráðgevaraútreiðslur, hondverkaraútreiðslur (HVÚ) og aðrar útreiðslur í verkætlanini. Hugsanin er at bjóða anleggsarbeiðið út sum undirhondsboð til tvey feløg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at gera ráðgevaraavtalu við felagið Henning Larsen við støði í avtalaðum tímum og tímataksti fíggjað av løgukontu L57033 Byrsumúli, skjótibreyt.

b). at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út og at samráðast við lægsta tilboðsgeva um sáttmála at leggja fyri nevnd.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Viðv. at velja fylgibólkaumboð
Mentamálanevndin samtykti 9. september 2020 at “at seta ein politiskan samstarvsbólk, har andstøða og samgonga velja hvør sítt umboð, at fylgja við útinnanini av arbeiðnum. Hetta er ikki gjørt enn og eigur støða at vera tikin av nýggjum um samtyktin skal útinnast ella ikki. Um limir skulu veljast verður tað gjørt á býráðsfundi.

Viðv. góðkenning av skipanaruppskoti

Arbeitt verður í løtuni við at fáa endaliga skipanaruppskotið liðugt og kemur málið væntandi til viðgerðar í nevnd við fyrst komandi høvi.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til um samtyktin frá 9. september 2020 skal útinnast.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 14. apríl 2021**: Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
26. mars 2021 var arbeiðið at gera arbeiðið at gera nýtt skjótianlegg í Sandvíkum boðið út sum undirhondsboð til 2 feløg. P/F Articon og P/F J&K Petersen.

Bert Articon lat boð inn.

Teirra boð var: 9.649.845 kr. (u/MVG).

Tilboðini eru gjøgnumgingin av ráðgevunum og hava teir latið tilmæli.

Síðani hevur umsitingin gjøgnumgingið tilfarið saman við ráðgevunum og Byrsumúla og síðani verið í samráðingum við Articon.

Við ymiskum tillagingum í verkætlanini, herundir viðv. brunnum og kloakk og arbeiðstilgongdini og uppbygnaðinum av lendinum, vil Articon innganga ein heildararbeiðstøkusáttmála við TK á 7.700 tkr. Samstundis sum allar neyðugar funkiónir og eginleikar vera mettar nøktandi. Sáttmálin fevnir tó ikki sum útgangsstøði um útvegan av dekkgróti til vøllgarðin, ið TK skal útvega, og kostnaður av hesum er ógreiður. Hartil kemur at neyðugt verður at útvega útgerð á umleið 600 tkr. afturat, ið ikki er íroknað verkætlanini í verandi støðu.

**Fíggjarviðurskifti og heildarkostnaður**
Umframt arbeiðstøkuna eru aðrar útreiðslur til útgerð, mvg, ókent, ráðgeving v.m. sí hjálagda skjal.

Hetta inniber at samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina verður umleið 10.390 tkr.

Samlaða fíggingin er 8.000 tkr. Tørvur er sostatt á umleið 2.390 tkr. í eyka fígging.

Innan íløgujáttanirnar konta 5775 Ítróttaranlegg ber til at fíggja hetta av øðrum verkætlanum. Uppskot er at játta 1.000 tkr. av Hoyvíksvølli (L57034), Tórsbreyt 500 tkr. (L57032), Fimleikahøll Kaldbak 400 tkr. (L57018), og Golfvøllur 500 tkr. (57016), hetta gevur kr. 2.400 tkr.

Øll neyðug loyvi fyriliggja nú til verkætlanina.

Arbeiðið í Sandvíkum kann byrja 17. mai 2021 og tekur umleið 5 mánaðir.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at samtykkja at innganga heildararbeiðstøkusáttmála á tkr. 7.700 við P/F Articon
b). at heildarkostnaðarkarmurin fyri verkætlanina verður 10.390 tkr., útgerð undantikið, og at restfíggingin 2.390 tkr. verður fingin til vega, áðrenn arbeiðið fer í gongd
c). at flyta 5.000 tkr. ætlaðar skjótibreyt av løgukarminum 5775 á projektkontu L57033 Byrsumúli, skjótibreyt.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælunum a), b) og c), og at restfíggingin 2.400 tkr. verður játtað soleiðis av kontu 5775 Ítróttaranlegg: 1.000 tkr. av projektkontu L57034 Verkløg við Hoyvíksvøll, 500 tkr. av projektkontu L57032 Tórsbreyt, 400 tkr. av projektkontu L57018 Fimleikahøll í Kaldbak, og 500 tkr. av projektkontu L57016 Golfvøllur - at flyta á projektkontu L57033 Byrsumúli, skjótibreyt.

Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfnn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at restfíggingin 2.400 tkr. verður játtað av konto 5775, ítróttaranlegg, L57015, langhylur.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti**:
Í sambandi við viðgerðina av málinum í vár var upplýst at tørvur var á ymiskari skjótitekniskari útgerð v.m. og at hesin tørvurin ikki var dekkaður av tøku játtanini.

Umsitingin hevur í heyst verið í samskifti við Byrsumúla og komin til at tørvur er á ymsari útgerð fyri umleið 600 tkr. Talan er um útgerð til trapp-breytina, umframt grassláimaskinum og einum ATV til uppsamling av proppum, umframt vogn til flutning og bingjur til burturkast. Upphæddin verður latin sum stuðul til felagið. Sbrt. galdandi samstarvsavtalu er felagið rakstrarharri á anlegginum og kemur at taka sær av m.a. rakstrinum av teknisku útgerðini v.m. Felagið hevur fingið trapp-kastimaskinuna á 270 tkr. til landið.

Játtanin higartil (2021) til verkætlanina rúmar ikki hesi upphæddini. Í sambandi við møguligan stuðul skal felagið skal lata skjalprógv fyri útreiðslunum.

Á løgukarminum 5775 fyri 2022 eru samtykt at seta 5.000 tkr. av til verkætlanina. Mett verður at hesin tørvurin á útgerð er alneyðugur fyri anleggið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at flyta 600 tkr.av løgukontu 5775, skjótibreyt (LK57033) (fíggjarárið 2022) til projektkontu L57033 Byrsumúli, skjótibreyt og játta Veiðifelagnum Byrsumúla upphæddina sum stuðul til útvegan av útgerð. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 01. desember 2021:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Formaðurin skjýtur upp at játta Veiðifelagnum Byrsumúla kr. 3 mió sum stuðul til bygging av felagshúsi av løgukarmi 5775 Ítróttaranlegg LKL57033 Byrsumúli, skjótibreyt. Felagið fer sjálvt at standa fyri arbeiðinum. Stuðulin frá kommununi er endaligur.

Um samtykt, er eftir á løgukarminum kr. 1.080.000.

Verkætlanin at gera skjótibreytina er annars liðug og løgukonta L57033 kann lokast. Fíggjarstøðan vísir eina meirnýtslu uppá kr. 9.732, sum verður at fíggja av løgukarminum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til at játta kr. 3 mió til Byrsumúla at byggja felagshús.

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at loka verkætlanina at byggja skjótibreyt í Sandvíkum løgukonta 57033 Byrsumúli, skjótibreyt, og í hesum sambandi at játta kr. 9.732 av løgukarmi LK57033 til løgukontu L57033.

Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 30. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina við tí viðmerking, at játtanin til Byrsumúla til felagshús verður ikki útgoldin fyrr enn tilboð uppá byggingina fyriliggur.

Gunvør Balle var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við at játta kr. 3 mió til Byrsumúla at byggja belagshús og at loka verkætlanina at byggja skjótibreyt í Sandvíkum, løgukonta 57033 Byrsumúli, skjótibreyt, og í hesum sambandi at játta kr. 9.732 av løgukarmi LK57033 til løgukontu L57033.

Málið beint í býráðið við teiri viðmerking, at játtanin til Byrsumúla til felagshús verður ikki útgoldin fyrrenn tilboð upp á byggingina fyriliggur.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

# 281/22 Golfvøllur á Glyvursnesi - byggiverkætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 309/19 | 19/04397-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 305/19 | 19/04397-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 271/19 | 19/04397-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 66/20 | 19/04397-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 77/20 | 19/04397-1 |
| 6 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 54/20 | 19/04397-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 277/20 | 19/04397-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 280/20 | 19/04397-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 30.11.2022 | 220/22 | 19/04397-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 297/22 | 19/04397-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 281/22 | 19/04397-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fyrr í ár varð sáttmáli gjørdur við avvarðandi festara og Búnaðarstovuna um endurgjald og leigu av økið 522.000 fermetur stórt á Glyvursnesi.

Sambært sáttmálanum skulu øll arbeiðir, ið fevnd eru av endurgjaldinum so sum girðingar og nýdyrking, verða avgreidd í seinasta lagi 31. desember 2022. Festarin hevur somuleiðis fullan og óskerdan nýtslurætt til gamla seyðahúsið og maskinhøll, fram til nýggja seyðahúsið við maskinhøll er bygt, tó í seinasta lagi 31. desember 2022.

Festarin hevur longu søkt um byggiloyvi til nýtt seyðahús.

Sambært sáttmálanum § 14,2 áliggur kommununi innan trý ár frá avtaludegnum at prógva fyri Búnaðarstovuni, at arbeitt verður ítøkiliga at gjøgnumføra verkætlanina at byggja golfvøll.

Ætlanin er nú at byrja sjálvt byggimálið, ið hevur sum fortreyt, at golfvøllurin verður bygdur í stigum alt eftir fígging. Í tillagaða verkætlanaruppskotinum frá 2017 varð lagt upp til, at hvørt byggistigið fevnir um trý hol, íroknað lendisgøtur, og at mál í fyrsta umfari er at byggja golfvøll við 9 holum, sum seinni kann byggjast út til fullan vøll 18 hol.

Søkt er um at broyta byggisamtyktina fyri partin av Glyvursnesi, sum fevndur er av golfvøllinum. Hetta er við at koma undir land.

**Verkætlanartilgongd**
Ætlanin er at skipa bólk at fyrireika byggiverkætlanina við umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Harumframt tilnevnir Tórshavnar Golffelag umboð í bólkin.

Ymisk stig eru í hesi fyrireikandi tilgongd.

Í fyrsta lagi er at fáa til vega projekttilfar. Í verkætlanaruppskotinum frá 2017 er lagt upp til projektering og bygging stig fyri stig yvir eitt fimm ára tíðarskeiðl. Design av golfvøllinum við lendisgøtum fyriliggur, men

neyðugt at er nágreina hetta bæði viðvíkjandi lendistillagingum, nøgdum av tilfari (sand, mold v.m.), vatnleiðing, dren o.a.

Ætlan er tí at fáa í lag avtalu við golfvallararkitektin um ráðgeving at byggja golfvøll á altjóða støði á Glyvursnesi. Partur av hesum er eisini at fáa til vega útbjóðingartilfar, kostnaðarmeting av anleggsarbeiðinum og tíðarætlan fyri bygging í stigum.

Hetta tilfar er grundarlag fyri umsókn til byggimyndugleikan og friðingarmyndugleikarnar um loyvi at byggja golfvøllin við tilhoyrandi installatiónum.

Hugskot hevur verið, at kaikanturin, sum gjørdur er á Glyvursnesi í sambandi við havnaútbyggingina, kann vera verandi til við tíðini at skapa eitt maritimt umhvørvi til frítíðarafelagsskapir, ferðavinnu v.m. Tórshavnar havn er av friðingarmyndugleikunum áløgd at taka burtur kaikantin, tá liðugt er at taka grót til havnabyggingina. Verandi kaikantur er heldur ikki bygdur til at halda leingi aftrat. At tryggja kaikantin at halda fleiri ár aftrat er kostnaðarmikið.

Í sambandi við byggitilgongdina er ynski, at tilfar til golfvøllin – m.a. mongd av sandi – kann siglast og fáast uppá land um kaikantin, heldur enn at verða koyrt eftir Glyvursvegnum. Kommunan kann søkja friðingarmyndugleikarnar um at leingja loyvið til kaikantin til endamáliðj við golfvøllinum. Spurningur er eisini, um hesin flutningur kann ella skal gerast í nærmastu framtíð, áðrenn kaikanturin ikki longur er nýtiligur.

Ætlanin er eisini at fáa gjørt ymsar vakstrarroyndir úti á Glyvursnesi eitt nú við ymsum grassløgum og at byggja eina *putting green* upp frá grundini.

Hvussu langt hesar fyrireikingar kunnu koma, er tengt at, hvør fígging er til endamálið. Til ber at geva neyvari meting um ráðgevarakostnaðin, tá samráðing hevur verið við golfvallararkitektin. Skal sandur og annað tilfar siglast út til Glyvursnes í nærmastu framtíð, er neyðugt við fígging. At gera ymsar royndir við tilfari og grasi krevur eisini fígging.

Í 2017 varð skotið upp at byggja 9 hol yvir eitt fimm ára tíðarskeið. Mett varð, at miðalkostnaður fyri hvørt holið er kr. 3 mió, tvs. ein samlaður kostnaður uppá kr. 27 mió. Tá varð skotið upp fígging í hesum lutum:

| Ár | Tkr. | Arbeiði |
|---|---|---|
| 1 | 4.000 | Projektering og snið. Fara undir holini 1-3 |
| 2 | 5.000 | Gera holini 1-3 liðug. Projektering og snið, fara undir holini 4-6 |
| 3 | 9.000 | 3 hol klár at brúka. Gera holini 4-6 liðug. Fara undir holini 7-9. Vatngoymsla. Venjingar-/upphitingarøki |
| 4 | 6.000 | 6 hol klár at brúka. Gera holini 7-9 liðug. Leggja ætlan fyri næstu 9 holini. |
| 5 | 3.000 | 9 hol klár at brúka. |

Felagshús og maskinhøll/tilfarsgoymsla er ikki íroknað.

Umframt kommunala íløgufígging er ætlanin saman við Golffelagnum at kanna møguleikar fyri uttanhýsis fígging bæði innlendis og í altjóða golfumhvørvinum. Í løtuni er fígging á løgukontuni til golfvøllin bert til at fíggja avtalaðu endurgjaldsupphæddina kr. 9.843.016 sambært sáttmálanum um lendið. Kommunan eigur í hesum sambandi at heita á landsstýrið um at halda avtaluna, sum gjørd er um, at landið ber endurgjaldskostnaðin og kommunan byggir og fíggjar golfvøllin.

Golfvøllurin hevur týdning fyri onnur mál í økinum, eitt nú Glyvursvegurin frá Hamrinum og út á nesið. Talan er í dag um arbeiðsveg, sum einaferð skal gerast samsvarandi vegstandardi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- at seta fyrireikandi verkætlanarbólk sum omanfyri lýst at fáa til vega uppskot til ráðgevaraavtalu við golfvallararkitekt at leggja aftur fyri nevnd
- at søkja friðingarmyndugleikarnar um loyvi til at brúka kaikantin á Glyvursnesi eftir, at havnabyggingin er liðug, til at føra sand og annað tilfar til golfvøllin
- at senda landsstýrinum áheitan um fígging til endurgjaldsupphæddina
- at játtan til bygging av golfvøllinum verður fingin til vega á íløguætlaninini, og
- at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært sáttmálanum um lendi til golfvøll á Glyvursnesi (j.nr. 14/00612) fall fyrsti avdráttur av gjaldinum kr. 2.460.754 til gjaldingar 1. november 2019. Samlaða sáttmálauppæddin er kr. 9.843.016.

Í løgukarminum 5775 Ítróttaranlegg fyri 2020 eru settar kr. 3,5 mió av til golfvallarverkætlanina. Næsti avdráttur uppá kr. 2.460.754 fellur til gjaldingar 1. november 2020. Teir báðir síðstu avdráttirnir fella til gjaldingar ávikavist 1. november 2021 og 1. november 2022.

Leigusáttmáli
Formligi nýtslurætturin hjá kommununi yvir lendinum sambært omanfyri nevnda sáttmála verður staðfestur í leigusáttmála millum kommununa og Búnaðarstovuna. Leigusáttmálin hevur heimild í lógini um landsjørð § 7a. Uppskot til leigusáttmála er nú klárt at samtykkja.

Leigugjald um lendi til almannagagnligt endamál er kr. 5.000 um árið, ið verður prístalsviðgjørd árliga. Uppkrav verður sent hvønn 1. desember, og fyrstu ferð hin 1. desember 2020. Leigusáttmálin er galdandi til 1. januar 2060, tvs., at talan er um leigumál í 40 ár, sum tá kann leingjast.

Matrikuleringsbroytingarnar eru ikki avgreidd enn. Formliga er tí talan um fyribils leigusáttmála. Tá matrikuleru viðurskiftini eru avgreidd, kann avtalan dagførast og tinglýsast.

Sambært sáttmálanum um lendið er tað kommunan, ið skal rinda kostnaðir til matrikulering og tinglýsing. Hesir kostnaðir eru tí ikki staðfestir enn og eru aftrat teimum kr. 9,843 mió nevndar omanfyri.

Byggiverkætlanin
Tøk játtan at arbeiða við sjálvari verkætlanini í 2020 er umleið kr. 750.000. Í langtíðaríløguætlanini er lagt upp til fígging árini 2021-2023 uppá kr. 22,5 mió.

Næsta stig er nú at fáa framleitt neyðugt projekttilfar til myndugleikaviðgerð, harundir eisini friðingarmyndugleikarnar. Ætlanin í ár er eisini at fáa gjørt ymsar vakstrarroyndir við ymsum grassløgum og mold/sand-blandingum.

Gongst væl eisini viðvíkjandi myndugleikaviðgerðini, er mál at byrja byggingina av golfbreyt/holi 1 í ár.

Til byggiverkætlanina er neyðugt at gera ráðgevingaravtalu við golfvallararkitektin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at:

- góðkenna uppskotið til 40-ára leigusáttmála við Búnaðarstovuna um lendið,
- geva fyrisitingini heimild at samráðast við golfvallararkitektin um ráðgevingaravtalu,
- at játta kr. 3,5 mió av løgukarmi 5775 Ítróttaranlegg ætlað golfvølli til løgukontu L57016 Golfvøllur, og
- at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanaruppskotið er nú so mikið búgvið, at til ber at fastleggja golfvallarsniðið og verkætlanarfasurnar, sum tryggja, at til ber at spæla golf samstundis sum bygt verður. Tær tríggjar fasurnar fevna um 9 hol/breytir, gøtusamband v.m., samstundis sum lagt er upp til at kunna vaksa um vøllin til 18 hol við tíðini.

Eftir ætlan verður verkætlanartilfarið sent til myndugleikaviðgerð, harundir byggiloyvi, í næstum, so at útbjóðing av verkætlanini kann fremjast um ársskiftið.

Mett verður skilabest, at tær tríggjar fasurnar verða bjóðaðar út í einum. Fyrimunur við hesum er, at arbeiðstakari er knýttur at verkætlanini, so at vitan um golfvallarbygging ítøkiliga ikki skal fáast til vega av nýggjum fyri hvørja fasu, og at hetta væntandi eisini hevur fyrimun at halda kostnaðinum niðri.

Tilfar íroknað kostnaðarmeting verður løgd fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fylgja lýstu verkætlanartilgongdini soleiðis, at umsitingin fær heimild til at søkja um neyðugu myndugleikaloyvini, og at verkætlanin eftirfylgjandi kann bjóðast út í innbodnari lisitatión.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Harumframt mælir ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, til at verkætlanin eftirfylgjandi verður bjóðað út alment.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við minnilutanum í mentamálanevndini.

**Ískoyti**
Golfverkætlanin er nú komin hartil, at myndugleikaviðgerðin í mun til endaligt byggiloyvi er í gongd, og tilfarið at bjóða arbeiðið út er í gerð. Eisini hevur kommunan nú goldið øll endurgjøld sambært sáttmálanum millum kommununa, Búnaðarstovuna og festaran um lendið.

Samráðst er við Edwin Roald, golfvallararkitekt, um ráðgevarasáttmála í sambandi við byggingina av golfvølli við 9 holum, sum er fyrsta byggistig. Edwin Roald hevur staðið fyri verkætlanaruppskotunum, sum gjørd eru fyri kommununa í 2013 og 2017, og hevur saman við verkætlanarbólkinum, har Golffelagið er umboðað, arbeitt víðari við uppskotinum og nágreining av staklutum bæði viðvikjandi lendinum og installatiónum).

Uppskotið til byggistig I heldur seg innnanfyri verandi byggisamtykt á syðra partinum av Glyvursnesi og ger seg sostatt ikki inn á vegir, sum Tórshavnar havn hevur gjørt í sambandi við havnabygging.

Uppskotið um ráðgevarasáttmála fevnir um veitingar í sambandi við byggistig I, sum er totalráðgeving, herundir sniðgeving og projekt, útbjóðingartilfar og ráðgeving undir útinning v.m. Samlaður kostnaður á hetta ráðgevaraarbeiðið er áljóðandi kr. 1.180.000.

Verkætlanin hevur lagt seg eftir hugsjónum um, hvussu ein burðardyggur altjóða golfvøllur skal byggjast, hetta bæði við atliti

- at tálma byggikostnaðinum,

- at golfvøllurin er lættur av røkja og soleiðis tálma rakstrarútreiðslunum,
- at ítróttaliga upplivingin verður eftir altjóða standardi,
- at gera góðar og lættgongdar lendisgøtur, ið knýtir allan vøllin saman, og sum almenningur eisini fær gleði av,
- at dentur er lagdur á umhvørvið og náttúruna sum heild, og har serfyribrigdi kunnu verða bygd inn í sniðið sum varandi virði, og
- at talan er um strategiska kommunala íløgu í golfítróttina, fólkaheilsuna, ferðavinnuna, náttúrudepil v.m.

<u>Felagsumstøður</u>
Sum partur av endugjaldssáttmálanum yvirtekur kommunan eisini seyðahúsið á Glyvursnesi. Formliga er hetta 1. juli 2023. Golffelagið ynskir at gera húsið um til felagshús sum liður í at seta ferð á menningina av golfspælinum og golfumhvørvinum sum heild, meðan golfvøllurin verður bygdur.

Húsið kann við ávísum umbyggingum hýsa øllum hentleikum hjá felagnum, leikarum, vitjandi og ferðafólkum bæði til kapping, venjing og sosialt uppihald. Haraftrat ætlar felagið at seta upp golfsimulatorar til venjing og spæl.

Húsið sum tað er ella útbygt kann eisini hýsa atknýttar funktiónir til golfvøllin eitt nú viðvíkjandi garasju, goymslu, útgerð, tøknirúmi, tilfar v.m.

Neyv ætlan um umbygging og dagføring av húsinum fyriliggur ikki, heldur ikki kostnaðarmeting. Eitt tað fyrsta er at fáa at leggja el-leiðing til bygningin, talan er um uml. 350 metrar.

Mett verður skilagott, at gjørd verður avtala við Golffelagið um ætlanirnar viðvíkjandi felagshúsi v.m., harundir eisini stuðulsfígging.

<u>Útbjóðing</u>
Í 2018 varð mett, at golfvøllurin á Glyvursnesi við 9 holum fór at kosta umleið 28 mió. Eingin nýggjari kostnaðarmeting er gjørd, men við at bjóða arbeiðið út nú fæst tað staðfest. Við støði í hesum ber eisini til hjá býráðnum at leggja langtíðarætlan viðvíkjandi fíggingina av byggiarbeiðinum.
Ætlanin er at bjóða byggistig I út í høvuðsarbeiðstøku, har ið høvuðsarbeiðstakarin átekur sær at gera alt byggistig I, tó yvir eitt longri tíðarskeið (t.d 5 ár), soleiðis at tryggjað verður, at til ber at spæla golf á Glyvursnesi í byggitíðini. Nágreining og arbeiðslag verður avgreitt saman við vinnandi arbeiðstakaranum.

Verkætlanin kann sostatt verða játtað í stigum í mun til ávísa arbeiðið, sum skal gerast, og arbeiðstakarin má leggja arbeiðið tilrættis eftir hesum treytum.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um gerð og uppbygnaður av 9 holum, hvar ið talan verður um avgrevstur av tilfari, boring og spreinging, javning av botni og uppfylling og planering fyri golfvølli, kloakk- og drenskipan, regnvatnsarbeiði og vatn-, el- og ljósarbeiði, v.m.

Umsitingin hevur ætlanir at bjóða føroyskan ráðgeva at standa fyri byggileiðslu og eftirlit á verkætlanini. Hetta verður í gjørt í samráð við golfvallararkitektin og umsitingina. Tá ið umsitingin hevur fingið tilboð á hetta arbeiðið, verður hetta lagt fyri nevnd aftur.

Tøk játtan til golfvøllin konta 5775 Ítróttaranegg L57016/LK57016 Golfvøllur á Glyrvursnesi er kr. 1.024.833. Harumframt eru í løgujáttan fyri 2023 kr. 2,5 mió aftrat. Samlað sostatt kr. 3.524.833.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at:

- samtykkja uppskotið til ráðgevarasáttmála og gera sáttmála við Edwin Roald, 1
- geva umsitingini heimild at bjóða út byggistig I eftir leisti, sum lýst omanfyri,

- í hesum sambandi at játta kr. 1.578.000 av løgukarmi 57016 og kr. 2,5 mió av løgujáttan í fíggjarætlanini fyri 2023 til løgukontu L57016 Golfvøllur á Glyvursnesi, og
  beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 30. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at kanna møguleikar fyri uttanhýsisfígging.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Elsa Berg legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at kommunan eisini langtíðarleigar øki við somu støðd at skipa sum náttúfufríøki.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, og Kristian Martin Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 282/22 Umstøðurnar kring tennisøkið í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 27.08.2018 | 249/18 | 18/01726-4 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 257/18 | 18/01726-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 351/18 | 18/01726-4 |
| 4 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 314/18 | 18/01726-4 |
| 5 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 135/19 | 18/01726-4 |
| 6 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 154/19 | 18/01726-4 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 188/19 | 18/01726-4 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 147/19 | 18/01726-4 |
| 9 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 53/20 | 18/01726-4 |
| 10 Mentamálanevndin | 06.04.2022 | 105/22 | 18/01726-4 |
| 11 Mentamálanevndin | 08.06.2022 | 141/22 | 18/01726-4 |
| 12 Mentamálanevndin | 30.11.2022 | 224/22 | 18/01726-4 |
| 13 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 302/22 | 18/01726-4 |
| 14 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 282/22 | 18/01726-4 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn frá Havnar Tennisfelag (HTF)

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Felagið ynskir at fáa endurnýggjað og betra um karmarnar fyri virksemi felagsins í Gundadali, herundir nýggja breyt, goymslu, ljós o.a.

Felagið er upprundaliga stovnað í 1934, men í longri tíðarskeið var onki virksemi inntil felagið var endurreist í 1996, tá hevði tennisvirksemi verið nøkur ár skipað innan Havnar Badmintonfelag á nýggjum tennisvallunum í Gundadali frá 1990. Vallirnir eru at kalla óbroyttir síðani tá og metir felagið at tíðin nú er komin at betra um karmarnar. Felagið hevur júst mannað nevndina av nýggjum og nýggjur høvuðsvenjari er settur í eitt ár, ið skal taka sær av regluligum venjingum summar og vetur, umframt gera fyrireikingar til Oyggjaleikirnar 2019. Eitt sersamband Tennissamband Føroya er sett á stovn í samráð við ÍSF. Ætlandi verður FM aftur skipað og ymisk átøk fyri at fáa fleiri limir afturat teimum 32 verandi limunum.

Ítøkiliga ynskir felagið at fáa gjørt fylgjandi:
- Nýtt felagshús
- Leggja graslíki á verandi vallir (verandi belægningur er ikki góður í vátum veðri) og sostatt fáa fleiri venjingartímar í árinum
- Fáa ein vøll afturat teimum báðum verandi, so fleiri fáa vant í senn
- Betra um ljósviðurskiftini, so spælast kann størri part av degnum og árinum

Uppá sikt kundi felagið hugsa sær at spurningurin um eina innandura tennishøll var tikin upp.

Felagið hevur fylgjandi uppskot til fígging:

- Graslíki leggjast á verandi vallir. HTF hevur móttikið tilboð fyri 2 vallir á 285 tkr. uttan mvg og toll. Søkt verður um at kommunan fíggjar 100 %.
- Ljósprojektørar setast upp við vallirnar. Søkt verður um at kommunan fíggjar 100 %. Ítøkilig meting er ikki gjørd enn! Eitt fyribils boð er eini 100 tkr.

- Ein vøll afturat eystanfyri verandi vallirnar. Søkt verður um at kommunan fíggjar 100 %. Neyvari meting má gerast av kostnaðinum.
- Nýtt felagshús verður bygt (sí tekningar). Eingin ítøkiligur kostnaður fyriliggur, men ein mettur prísur er 1.600 tkr. (80 m2 x tkr. 20). HTF eginfíggjar 400 tkr., svarandi til 25 %. Søkt verður um at kommunan kann stuðla við restini, uml. 1,2 mió. kr.

Umsitingin metir at í sjálvum sær er talan um eina áhugaverda og viðkomandi verkætlan, ið er ætlað at bera eina lítla ítróttagreina víðari fram á leið, bæði hvat viðvíkur hentleikum og møguleikum fyri venjing o.a. Tó so at tríggir vallir ikki eru nokk til møguligar komandi Oyggjaleikir.

Í verandi støðu eru ikki avsett játtan til gerð av nýggjum vølli, felagshúsi, meðan at ætlanin um at skifta belægning á verandi vallum møguliga kann greiðast innan raksturin hjá Ítróttaanleggum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar.
**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 18/01964 Nýtt spælipláss í Gundadali og mál 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið v.m.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi.

**Umhvørvisárin**
Nakað í sambandi við bygging o.a.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið fer ætlandi at vera viðgjørt víðari saman við Býarskipanardeildini, teknisku deild v.fl.)

**Skjøl**
Framløga um virksemi felagsins v.m.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til beina spurningin um staðseting av møguligum eyka tennisvølli og felagshúsi í byggi- og býarskipanarnevndina til viðgerðar.

**Mentamálanevndin 27. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekniska fyrisiting og trivnaðarfyrisitingin hava reist málið 18/03453 Skipan av Gundadali, ið snýr seg um at fáa uttanhýsis ráðgeva til at menna eina heildarætlan yvir ítróttaøkið í Gundadali.

Í økinum halda flestu ítróttagreinar til, og skal heildarætlanin lýsa hvussu Gundadalur kann rúma øllum virksemi á økinum, umframt møguligum nýggjum virksemi. Staðsetan av virksemi hjá tennisfelagnum er natúrligur partur av hesi heildarætlanini.

Í hesum sambandi hevur býarskipanardeildin mælt til, at uttanhýsis ráðgevin, ið kemur at standa fyri verkætlanini, skal kanna og finna uppskot til staðsetingar av virksemi hjá tennisfelagnum.

Í málinum **18/03453 Skipan av Gundadali** verður skrivað soleiðis:

*"Tennis er ein ítrótt í menning. Tennissamband Føroya er nýtt sersamband, sett á stovn í samráð við ÍSF. Havnar Tennis Felag hevur sett nýggjan høvuðsvenjara, sum skal taka sær av at gera fyrireikingar til Oyggjaleikir 2019, og ynskir Tennisfelagið at fáa endurnýggjað og betra um karmarnar fyri virksemi felagsins"*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at lata uppgávuna um staðseting av virksemi hjá Tennisfelagnum til ráðgeva, ið stendur fyri málinum "Skipan av Gundadali" og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina malið í býráðið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Havnar Tennisfelag hevur meldað út, at felagið fegin vil fáa skift belægningin á verandi breytum og um tað verður gjørt nú í næstum, so tað fer at bera til at spæla og venja komandi sesong.

Tilber hjá veitara at koma í juni og tekur arbeiðið eini 2 vikur. Felagið ynskir at TK rindar 100% av arbeiðinum, ið er mett til umleið 285 tkr. umframt MVG.

Við hesum er spurningurin um eina triðju breyt meiri ella minni sleptur. Í næstum kemur málið um skipan av Gundadali fyri í nevndunum og er har sum er ikki lagt upp til at ein triðja breyt skal koma afturat.

Felagið ynskir harumframt at montera ljós við vøllin og gera eitt felagshús. Málið um skipan av Gundadali kemur eisini inn á tann spurningin.

Verandi breytir trongja til endurnýggjan og útlit fyri aðrari staðseting ella møguligari høll eru longri frammi í tíðini. Tískil er helst skilagott at fáa gjørt verandi anlegg betri.

Hóskandi er at fara í dialog við felagið og gera eina samstarvsavtalu um skipan av anlegginum og býtið millum TK og felagið um útreiðslurnar fyri m.a. endurnýggjan av breytunum. Møgulig fígging kann vera av kontu 5370 Stuðul til íløgur og/ella partvíst frá Ítróttaanleggum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at gera uppskot til samstarvsavtalu og herundir kostnaðarbýtið og koma aftur í nevnd við úrslitinum til komandi fund.

**Mentamálanevndin 03. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Jákup Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur samráðst við Havnar Tennisfelag um málið. Uppskot til avtalu (sí hjálagt) er gjørt, ið inniber fylgjandi:

a). at HT og TK deilast um at rinda fyri útskifting av verandi belægningi í lutfallinum 50%/50% og at kommununar partur verður rindaður av Ítróttaanleggum kontu 5717.

b). at TK innan í 2020 fær betra um ljósviðurskiftini við tennisvøllin og rindar fyri tað. Metingin er at arbeiðið kostar umleið 80-100 tkr. Ætlanin er at skjóta upp at arbeiðið verður fíggjað av konto 5775 smærri ítróttaanlegg í 2020. Ætlanin er at loysnin skal vera sámulig og ikki innibera órógvandi ljósdálking fyri grannalagið.

c). at TK innan 2020 útvegar eina fyribils bingju til fyribils klubbhús við tennisvøllin. Arbeitt verður við at finna hóskandi og ódýra loysn. Loysnin er treytað av at byggivaldið góðkennir staðsetingina og at TK finnur eina hóskandi fyribils loysn.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at innganga hjáløgdu avtalu við Havnar Tennisfelag.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Status viðv. útinning av verkevnunum frá 8. mai 2019:

Ad. a) Nýggjur belægningur á breytunum
Síðani málið var viðgjørt seinast er pkt. a blivið útint og tekur seg væl út og økir um nýtslutíðina av breytunum.

Ad. b). Ljósskipan til anleggið
Í málinum stóð at skipanin skuldi fíggjast av konto 5775 smærri ítróttaanlegg í 2020. Ongin játtan er til smærri ítróttaanlegg í 2020. Síðani eru eisini neyvari metingar gjørdar viðv. loysn og komin eftir at hon helst kostar umleið 280 tkr. Ítróttaanlegg kto. 5717 hevur møguleika at raðfesta tað innan sína rakstrarjáttan fyri 2020. Arbeiðstøkan verður bjóðað tveimum veitarum.

Ad. c.) Klubbhús
Umsitingin hevur kannað málið nakað, men enn ikki klár við nakrari loysn. Málið verður kannað víðari.

**Tilmæli**:

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at broyta fíggingina av eini ljósskipan til at vera av rakstrarkontu 5717 Ítróttaanlegg.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Í 2019 gjørdi TK og Havnar tennisfelag samstarvsavtalu um ábøtur, menning og rakstur av tennisanlegginum í Gundadali.

Í 2019 bleiv tennisbreytirnar endurnýggjaða. TK og felagið rindaðu umleið helvt um helvt.

Í 2021 bleiv nýmótans ljósskipan sett upp. TK rindaði alt, men felagið viðvirkaði í at fáa týðandi avsláttur uppá veitingar.

Eftir er spurningurin um klubbhús.

Í 2021 bleiv partur av eini lon, ið áður hevur staðið á byggiplássinum úti á Fløtum, flutt á øki vestanfyri tennisanleggið. TK hevur fingið gjørt nakað av lendisarbeiði har lonin stendur.

Í sáttmálanum millum TK og HTF er ásett at partarnir skulu gera semju. HTF fer at fáa ábyrgd av rakstrinum, meðan Ítróttaanlegg av viðlíkahaldi uttan, umframt at brúksavtala verður gjørd.

HTF hevur fingið gjørt eina verkætlan fyri klubbhúsið og heinta inn tilboð. Samlaða íløgan (íroknað MVG) er 873 tkr. og hugsar felagið at TK rinda umleið 505 tkr. og felagið umleið 368 tkr.

Henda upphædd er ov høg til at Ítróttaaanlegg – kto. 5717 kann geva eitt ískoyti. Tískil er neyðugt at fáa tikið støðu til evt. fígging. Umsitingin kann t.d. vísa á fígging á løgukontum innan grein 5.

Sum skilst hevur HTF eina rímiliga eginogn.

Síðani felagið fekk nýggjar breytir og ljós er virksemi hjá felagnum munandi økt, bæði í tali av íðkarum og í væl størri part av árinum. Nýggja breytin tolir væl betri at tað er vátt, umframt at ljósini ger at spælast kann størri part av døgninum og árinum. LED-ljósloysnin hevur eyðnast sera væl hvat viðv. lága ljósdálking til grannalagið.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini at taka støðu til um fígging skal útvegast til part av fíggingini til liðugtgerð av klubbhúsi til tennis.

**Mentamálanevndin 06. apríl 2022:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Víst verður til eykajáttan til kontu 5370 Stuðul til íløgur, mál 22/02292, ið fer til aðru viðgerð á næstkomandi býráðsfundi.

Sum liður í samstarvsavtaluni lýst omanfyri er stuðulsparturin hjá kommununi at seta klubbús við tennisanleggið kr. 505.000. Vísandi til, at játtanin á kontu 5370 Stuðul til íløgur í 2022 er avmarkað, er uppskot at játta kr. 252.000 í 2022, og at mál um møguligan meirstuðul verður tikin upp aftur í 2023, um játtan er tøk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at játta Tennisfelagnum kr. 252.000 í stuðli av kontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Mentamálanevndin 08. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við, at ítróttarfeløg, sum gera íløgu yvir kr. 1 mió, hava rætt til at fáa MVG afturgoldið, hevur HTF sent skriv inn tann 28. oktober 2022 við ynski um, at nevndin játtar reststuðulin av teimum 505.000, sum ætlaður var sum stuðul, í hesum árinum, tí freistin gongur út á nýggjárinum. Talan er um kr. 253.000.

Sambært avtaluni millum kommununa og tennisfelagið skal kommunan veita hóskandi bingju til felagshúsið. Tað vísti seg, at bingjan mátti umvælast viðvíkjandi roti o.ø. í samráð við kommununa hevur felagið tikið á seg at útinnan hesar umvælingar, og er kostnaðurin kr. 111.000, sum felagið ynskir kommununa at endurgjalda

Samlaði stuðulin er sostatt kr. 364.000.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Tennisfelagnum kr. 364.000 í stuðli av kontu 5370 Stuðul til íløgur av játtanini fyri 2022. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 30. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Gunvør Balle var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

# 283/22 HB : Umsókn um íløgustuðul til umbyggingar í HB-húsinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 09.03.2022 | 66/22 | 21/00581-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 30.11.2022 | 226/22 | 21/00581-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 300/22 | 21/00581-2 |
| 4 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 283/22 | 21/00581-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn um íløgustuðul til umbyggingar í HB-húsinum. Umsóknin er dagfest 4. februar 2021.

**Lýsing av málinum**
Umsókn frá HB um íløgustuðul til viðlíkahald og dagføring av HB-húsinum.

HB vísir á, at HB-húsið er bygt fyri 30 árum síðani og at húsið er nógv brúkt hesi árini. Bygningurin er nógv slitin og ótættur, og mugu ábøtur gerast fyri at fáa hann tættan.

HB hevur viðlagt eina raðfesting av íløgum/dagføring av felagshúsinum komandi árini. Skjalið við raðfestingini er knýtt í málið.

Ynski er at íløgustuðulin verður deildur út á 3 fíggjarár.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Leiðreglur fyri at veita stuðul av kontu 5370 Stuðul til íløgur, samtyktar av mentamálanevndini 03.09.2015.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sbrt. § 3, stk. 3 í "Leiðreglunum fyri stuðul til íløgur", kann stuðulin í mesta lagi 30% av metta byggikostnaðinum.

Ongin tøk fígging er á kontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini frá at játta stuðul í 2022.

**Mentamálanevndin 09. mars 2022:** Samtykt at boða umsøkjaranum frá, at málið verður tikið upp til viðgerðar, tá játtan er til endamálið í fíggjarætlanini.

**Ískoyti:**
Formaðurin vísir á fíggjarætlanina 2023 konta 5370 Stuðul til íløgur og skjýtur upp, at játtað verður kr. 1 mió í íløgustuðli til ætlanina, og sum er uml. 30% av kostnaðinum hjá HB at dagføra HB-húsið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at játta kr. 1 mió í stuðli til verktætlanina av kontu 5370 Stuðul til íløgur av játtanini í 2023, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 30. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Gunvør Balle var ikki við í viðgerðini av fundinum.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

## 284/22 B36 : Umsókn um íløgustuðul til umvælingar v.m. í B36-húsinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 09.03.2022 | 67/22 | 21/00888-5 |
| 2 Mentamálanevndin | 30.11.2022 | 227/22 | 21/00888-5 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 301/22 | 21/00888-5 |
| 4 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 284/22 | 21/00888-5 |

**Upprunin til málið**
Skriv, dagfest 24. februar 2021, viðv. viðlíkahald og dagføring av felagshúsinum hjá B36.

**Lýsing av málinum**
Umsókn frá B36 um íløgustuðul til viðlíkahald og dagføring av felagshúsinum hjá B36.

B36 hevur saman við byggikønum gjøgnumgingið húsið, og kanningin vísir, at tørvur er á meira enn 3 mió kr., umframt at undirtekjan helst skal skiftast um ikki alt ov langa tíð.
B36 hevur viðlagt eina raðfesting av íløgum/dagføring av felagshúsinum hjá B36 komandi árini. Skjalið við raðfestingini er knýtt í málið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Leiðreglur fyri at veita stuðul av kontu 5370 Stuðul til íløgur, samtyktar av mentamálanevndini 03.09.2015.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongin játtan er eftir á konto 5370 – Stuðul til íløgur.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Sbrt. § 3, stk. 3 í "Leiðreglunum fyri stuðul til íløgur", kann stuðulin í mesta lagi 30% av metta byggikostnaðinum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:** Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at Mentamálanevndin tekur støðu til, um umsóknin frá B36 til íløgustuðul skal raðfestast komandi fíggjarár.

**Mentamálanevndin 09. mars 2022:** Samtykt at boða umsøkjaranum frá, at málið verður tikið upp til viðgerðar, tá játtan er til endamálið í fíggjarætlanini**.**

**Ískoyti:**
Formaðurin vísir á fíggjarætlanina 2023 konta 5370 Stuðul til íløgur og skjýtur upp, at játtað verður kr. 1 mió í íløgustuðli til ætlanina, og sum er uml. 30% av kostnaðinum hjá B36 at dagføra B36-húsið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at játta kr. 1 mió í stuðli til verktætlanina av kontu 5370 Stuðul til íløgur av játtanini í 2023, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 30. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Gunvør Balle var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

## 285/22 Müllers Pakkhús – nýtt gólv til miðhæddina (2. hædd)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 76/18 | 15/03409-23 |
| 2 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 56/18 | 15/03409-23 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 84/18 | 15/03409-23 |
| 4 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 305/22 | 15/03409-23 |
| 5 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 285/22 | 15/03409-23 |

**Málslýsing:**
Í 2015 varð farið undir at leggja nýtt gólv á miðhæddina í Müllers Pakkhúsi. Játtaðar vóru kr. 2.582.000 til endamálið. Byggingin hevði við sær krav um byggiloyvi, tí nýtslan broyttist frá at fevna um goymslurúm til almenna nýtslu. Í byggiloyvinum vórðu krøv sett til brunatrygdina, sum gjørdu, at verkætlanin gjørdist dýrari, og tískil varð í 2016 játtað í alt kr. 3.900.000 aftrat fyri at fáa umvælingarnar lidnar, soleiðis at endaliga byggiloyvið og nýtsluloyvið kundu útskrivast.

Av tí at talan er um ein gamlan bygning, bygdur í 1890-árunum, lýkur hann ikki nútímans reglur og ásetingar sambært bygningskunngerðini, og eru tí serskildar loysnir gjørdar fyri at loysa byggi- og brunaviðurskiftini. Loysnirnar vóru treytaðar av góðkenningum frá m.a. Dansk Sprinkler Teknik og skjalprógvan frá verkfrøðingi, og hevur verið nógv eykaarbeiði í sambandi við at fáa endaligu góðkenningarnar. Eyka arbeiðið hevur havt við sær eina meirnýtslu á løgukontuni kr. 303.516 pr. árslok 2017.

Leigusáttmáli millum Tórshavnar kommunu og Lions Club varð undirskrivaður fyri meira enn einum ári síðani, har virksemið hjá Lions Club skal halda til í einum av glasrúmunum á ovastu hæddini, umframt at teir við jøvnum millumbili fáa høvi at nýta fullu hæddina til tiltøk.

Bygningurin kann sum er ikki takast í nýtslu, tí enn vantar nakað av arbeiði í sambandi við umvælingarnar. Áðrenn endaliga byggi- og nýtsluloyvið kann útskrivast, er neyðugt:

- at gera styrkingar av konstruktiónini á miðhæddini, har víst verður á tvinnar loysnir. Ein timburloysn við skrábondum kann gerast fyri kr. 130.000, meðan ein loysn við stáldragarum og sjónligum jarnboltum kann gerast fyri áleið kr. 300.000 (kostnaðarmeting). Hæddin á miðhæddini er ein avbjóðing, og tískil vil ein timburloysn taka nakað av hæddini, meðan ein loysn við stáldragarum vil skemma bygningina.
- liðugtgerð av el arbeiði og góðkenning frá SEV.
- innbúgv til (glas)fundarhølini á ovastu hæddini, har talan er um tvey borð, stólar og ljós (fýra lampur). Ynskiligt er, at innbúgvið gerst ein partur av bygninginum, og vórðu gomlu hurðarnar í goymsluklivunum á ovastu hæddini varðveittar við tí endamáli at tær kunnu endurnýtast til tvey borð (snikkaraarbeiði).
- skelting og liðugtgerð (krøv eru til brunaskelti v.m.). Talan er um snøklar, sum t.d. brunamáling av einum einkultum vatnrøri v.m.

Verkætlanin varð byrjað uttan fulla fígging, og eru umvælingarnar gjørdar, so hvørt avbjóðingarnar hava víst seg. Áðrenn bygningurin kann takast í nýtslu er neyðugt at gera seinastu umvælingarnar. Kostnaðurin av hesum er mettur at verða áleið kr. 300.000, tá er roknað við eini timburloysn í sambandi við styrkingarnar av kontruktiónini á miðhæddini. Aftrat kemur so meirnýtslan á kr. 303.516, tvs. í alt kr. 600.000 at játta á kontu 5375 Müllers Pakkhús.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at játtaðar verða kr. 600.000 av konto 6175 til kontu 5375 Müllers Pakkhús at gera seinastu umvælingarnar, soleiðis at endaliga byggi- og nýtsluloyvið kunnu útskrivast og bygningurin takast í nýtslu, og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 600.000 av konto 6175 til konto 5375 Müllers Pakkhús sum eykajáttan og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Peningur bleiv í 2015 játtaður til verkætlanina L53003, Müllers Pakkhús - umvæling. Í fyrsta umfari varð farið undir at leggja nýtt gólv á miðhæddina, og bleiv játtanin seinni hækkað í sambandi við broyttu nýtsluna og tey brunakrøv, ið fylgdu við umframt at umvælingin varð broytt til at fevna um allan bygningin og ikki einans miðhæddina. Saldoin á verkætlanini er kr. 42.000 í halli.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5314 | (rakstrar konto) | Müllers Pakkhús | 5375 | L53003 | Müllers Pakkhús - umvæling | | Kr. 42.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, Trivnaðar stjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at loka verkætlanina Müllers Pakkhús L53003, at fíggja hallið á kr. 42.000 av rakstrarkonto 5314, Müllers Pakkhús, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

# 286/22 Áheitan um at fáa nýggjan leigusáttmála til dynamittgoymsluna í Flatnahaga á Bøllureyni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.10.2022 | 192/22 | 22/05494-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 22/05494-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 323/22 | 22/05494-2 |
| 4 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 286/22 | 22/05494-2 |

**Upprunin til málið**
P/F Borg hevur við skrivi dagfest 29. september 2022 søkt kommununa um at fáa nýggjan leigusáttmála til dynamittgoymslu í Flatnahaga á Bøllureyni. Økið skal verða 470 $m^2$ til víddar, og ynski er, at sáttmálin skal hava eina longd uppá 15-20 ár.

Saman við umsóknini er uppskot til nýggja staðseting, og P/F Borg skriva, at nýggja staðsetingin liggur á einum tryggum staði, langt frá bústøðum.

**Lýsing av málinum**
Tekningarnar sum P/F Borg heva latið inn vísa, at nýggja staðsetingin liggur beint norðanfyri vindmyllurnar hjá Magn í Flatnarhaga á Bøllureyni.

Søkt verður um at leiga 470 $m^2$, og ætlanin er at byggja ein bygning uppá 12 x 8 m, innrættaður við trimum rúmum. Hæddin á bygninginum verður 3,0 og 3,5 m.

Økið, sum søkt verður um, liggur í kotu 274, og ætlanin er, at økið skal verða innhegnað við hegni sum er 2,5 m høgt, portur verður til atkomu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2021 um tilbúgving § 37 eru ásetingar um eldhættisligt virksemi.

Í kunngerð nr. 11 frá 30. januar 1980 um goymslur til spreingievni er ásett í kapitul 4 § 4 um størri goymslur til spreingievni, at ein tílík ætlan skal góðkennast av Arbeiðseftirlitinum.

Í kapitul 2 § 2 um trygdarfráleika, er ein talva, sum vísir trygdarfráleikan í mun til ta goymdu nøgdina.

**Upplýsingar frá umsitingini**
P/F Borg hava síðani 2016 havt sáttmála við Tórshavnar kommunu um leigu av einum øki til goymslu av dynamitti, har ein bygningur eisini stendur. Hesin sáttmáli gekk út tann 31.06.2022. Í grein 6 í sáttmálanum stendur, at tá leigusáttmálin gongur út, og hann ikki verður endurnýggjaður, fellur økið aftur til kommununa. Leigusáttmálin er ikki endunýggjaður.

Nú kommunan hevur gjørt eina nýggja serstaka byggisamtykt fyri økið, í sambandi við at Magn byggir vindmyllur á staðnum, so ber ikki til at leingja verandi leigusáttmála, tí tað ber ikki til at hava dynamittgoymslu so tætt við nýggju vindmyllurnar. Tí skal eitt nýtt øki finnast til endamálið.

Økið, sum P/F Borg nú søkir um, er partur av Flatnahaga, sum Tórshavnar kommuna eigur.

Samskifti hevur verið við umsøkjaran, sum hevur latið kommununi eina kostnaðarmeting av, hvat tað fer at kosta at flyta dynamittgoymsluna, metingin ljóðar uppá kr. 1.867.440.
Umboð fyri P/F Borg hevur spurt, um Tórshavnar kommuna kann gjalda ein part av kostnaðinum av at flyta dynamittgoymsluna, t.d. kostnaðin av at gera vegatkomu til økið.

Í sambandi við nýggju staðsetingina, má kommunan tryggja sær, at staðsetingin kann verða so tætt vindmyllulundini hjá Magn, í mun til trygdarfrástøðu, sum Arbeiðs- og brunaeftirlitið ásetur, og eisini tá hugsað verður um, at Magn skal tekna eina trygging fyri vindmyllulundina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Málið um vindmyllurnar hjá Magn.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur ikki verið hjá øðrum deildum.

**Skjøl**
j.nr. 22/05494-1, umsókn, tekningar o.a.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til, at kommunan gongur umsóknini á møti, treytað av, at loyvi fæst frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, at staðsetingin kann góðkennast í mun til trygging av verkætlanini hjá Magn, at leigusáttmáli fæst við kommununa, og annars við møguligum treytum, sum Arbeiðs- og brunaeftirlitið og umsetingin setur.

Eisini verður mælt til at beina málið í fíggjarnevndina í sambandi við leigusáttmálan og møguliga luttøku av kostnaði til vegatkomu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, samtykti, at umsitingin kannar eftir, um tað ber til at staðseta goymsluna norðan fyri tjørnina á Sundshálsi, og um ikki avtala fæst við umsøkjaran og festaran um hesa staðseting, so at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Kári Johansen, mælir til at flyta staðsetingina út á Glyvursnes.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt í málinum.

**Ískoyti.**

Leigarin hevur sent kommununi uppskot til nýggja staðseting, sum liggur longur norður. Sí nýgg umsókn og kortskjøl j.nr.22/05494 – 8.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur í teldubrævi dagfest 25. november, góðtikið nýggju staðsetingina, og gevur loyvi til at hýsa 10 tons av spreingievni. Arbeiðs- og brunaeftirlitið viðmerkir, at tá goymslan er

liðugt bygd- og lýkur krøvini í « Kunngerð nr.  11 frá 30 januar 1980 um goymslur til spreingievni, sum er broytt við kunngerð nr. 122 frá 23. oktober 1996 « skal sýnast og endaliga góðkennast av Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, áðrenn hon verður tikin í nýtslu. J. nr. 22/05494-12.

Viðmerkjast skal, at atkoman til nýggju staðsetingina er frá vegnum, sum liggur millum verandi uppsettu vindmyllur, og sum er partur av leigumálinum við P/F Flatnahagi.

P/F Flatnahagi hevur góðtikið staðseting og íbinding í veg.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til 20 ár leigusáttmála. J.nr. 22/05494-14

Kommunan hevur tó tilskilað sær rætt til at uppsiga leigusáttmálan við eitt árs freist, tó í fyrsta lagi til 10 ár eftir at leigusáttmálin er komin í gildi. Leigarin kann siga leigumálið upp við eitt árs freist. Tá ið leigumálið endar, skal leigarin, um kommunan krevur tað, lata lendið aftur sum hann tók við tí, ruddað og reingjørt, og kann leigarin tá ikki krevja endurgjald av nøkrum slag í hesum sambandi.

Leigarin leigar stykkið sum tað liggur, og átekur sær fyri egnan kostnað allar neyðugar íløgur til ætlaða brúkið, herundir at gera veg til stykkið.

**Tilmæli.**

Leiðarin í byggimálsdeildini, kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at gera nýggjan leigusáttmála við P/F Borg um sí uppskot til leigusáttmála J. nr. 22/05494-14

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddi: Kári Johansen.

# 287/22 Útskifting av maskinu til jarnplássið hjá Kommunalu Brennistøðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.05.2022 | 24/22 | 22/01300-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 283/22 | 22/01300-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 267/22 | 22/01300-1 |
| 4 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 287/22 | 22/01300-1 |

**Upprunin til málið**
Kommunala Brennistøðin hevur 2 maskinur (G01 og G04), ið eru ætlaðar til at handfara og avskipa jarn. Maskinan, sum undir avskipan er á jarnplássinum (G04), er nú vorðin so niðurslitin, at hon er lívshættislig og ikki megnar arbeiðið. Seinastu avskipingarnar hevur tí verið neyðugt at líta á vælvild frá øðrum við maskinum til arbeiðið. Tó er bara møguligt at leiga maskinur frá øðrum, tá tær eru til taks. Tað ger avskiping av jarni ov viðbrekna, tí neyðugt er at avskipa, tá jarnprísurin er hægstur.

**Lýsing av málinum**
Maskinan, sum er á jarnplássinum, ein Sennebogen 830E (G04), er hon, sum skilir og klippir jarn og føðir pressuna. Hon er á donskum fakmáli ein "materialehåndterer" og er sergjørd til endamálið. Maskinan hevur júst røttu stødd og røkkur akkurát tað, sum hon skal. Eisini kann stýrhúsið lyftast upp. Tað ger, at førarin sær, hvat ið hann arbeiðir við, og kann hyggja niður í pressuna og ísv. at lastbilar verða fyltir. Maskinan er frá 2007 og sostatt 15 ára gomul. Hon hevur koyrt 12.578 tímar, er uppslitin, og nú vorðin vandamikil fyri føraran. Tað loysir seg ikki at umvæla hana. Saksurin má eisini skiftast.

Hin maskinan, ein Sennebogen 835E (G01) er størri. Hon kann laga kroystar bilar og annað jarn upp í rúgvur. Hetta er neyðugt fyri at kunna gagnnýta goymsluøkið og har kunna savna nóg nógv jarn saman til eina avskipan og at kunna stýra, nær man avskipar, og soleiðis fáa besta prís fyri jarnið. Tann størra maskinan er ov stór til tað vanliga arbeiðið við at føða jarnpressuna, m.a. tí at hon hevði komið í SEV-leiðingina, sum hongur yvir einum parti av arbeiðsøkinum kring pressuna. Í sambandi við avskipan av jarni má tann størra maskinan vera á keiini; bummurin røkkur so mikið langt, at maskinan kann leggja jarnið niður í lastina. Eingin onnur maskina er í landinum, sum er egnað til avskipan av jarni, ei heldur til størri lossingaruppgávur. Tí verður hon eisini eftirspurd og nýtt til aðrar uppgávur upp á rokning.

Um tann minna maskinan ikki verður útskift, ber ikki til at leiga ta størru maskinuna út til onnur arbeiðir.

Aðrir møguleikar eru kannaðir fyri ta minnu maskinuna, sum má útskiftast. Tó hevur eingin onnur maskina víst seg at nøkta tørvin og krøvini til arbeiðið. Eisini eru førararnir á innleigaðu maskinunum ikki vanir at arbeiða við avskipan av jarni. Tí megna teir ikki at arbeiða nóg skjótt, so avskipaða jarnmongdin verður ov lítil. Hetta ger, at tað fyri hvørja avskipan fæst minni av jarni við skipunum, sum verða leigað fyri ávíst daga- og tímatal. Úrslitið er, at kostnaðurin fyri at avskipa hvørt tons av jarni økist óneyðuga nógv, og Brennistøðin og við hesum Tórshavnar kommuna missir inntøkur.

Eisini er tað bara møguligt at leiga maskinur frá øðrum, tá ella um tær yvirhøvur eru til taks. Tað er meiri enn so komið fyri, at leigaðu maskinurnar eru gingnar fyri stutt áðrenn ella undir arbeiðinum. Tað ger avskiping av jarni við leigaðum maskinum ov viðbrekna, tí neyðugt er at kunna útføra arbeiðið, tá jarnprísurin er hægstur, og skip eru tøk.

Mælt verður tí til, at tann minna maskinan (G04) verður útskift við eina nýggja, og at maskinurnar hjá Kommunalu brennistøðini til avskipan av jarni eru í stýrdari eftirlits- og viðlíkahaldsskipan, sum gjaldsavtala verður gjørd um við kommunala verkstaðið.

Kannað verður eftir, um tað ber til at keypa og nýta eina elektriska maskinu til endamálið. Fyribilskanningar vísa, at sami veitari, Sennebogen kann veita eina elektriska maskinu fyri um 300.000 kr. hægri kostnað enn við dieselmotori. Tann maskinan hevur ikki innbygt battarí, og kann sostatt bert arbeiða við el-kaðali. Áðrenn endalig støða verður tikin, er neyðugt at kanna, hvat ið krevst fyri, at tað skal bera til, um tað er møguligt at fremja arbeiðini, sum maskinan skal brúkast til við el-kaðali hangandi úr maskinuni. Eisini er neyðugt at samskifta við avvarandi myndugleikar um trygdarviðurskiftini hesum viðvíkjandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi
Kunngerð nr. 128 frá 4. september 1995 um lyftiútgerð og spøl (kranar)
Bekendtgørelse nr. 1109 af 15. december 1992 om anvendelse af tekniske hjælpemidler
Kunngerð nr. 8 frá 13. februar 2002 um innrætting av føstum arbeiðsplássum
Lógir og kunngerðir um el og trygd í hesum sambandi, sí arb.fo/eltrygd-log-og-kunngerdir

**Upplýsingar frá umsitingini**
Jarnprísurin er óvanliga høgur í løtuni, og tí verður mett, at rúmd er í rakstrinum til at nýta ein part av søluinntøkunum av jarni í 2022 til at fíggja útskiftingina av G04. Mett verður, at kostnaðurin av at útskifta maskinuna vinnur seg inn aftur í væntaðu livitíðini hjá maskinuni.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Inntøkur.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Býarverkfrøðingurin, Fríður Pállsson Dalsgarð, og leiðarin á Kommunala verkstaðnum, Atli Simonsen taka undir við leistinum. Frameftir verður alt kravt og tilmælt viðlíkahaldseftirlit framt stundisliga og skrásett í skipanini hjá verkstaðnum. Fyrisitingin leggur ein leist fyri gjaldsavtalu millum brennistøð og verkstað um hetta.

**Skjøl**
22/01300-1 Viðmerkingar frá kommunala verkstaðnum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | X | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | X | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin fyri Kommunalu Brennistøðina mæla til, at tann minna maskinan (G04) verður útskift við eina nýggja. Jarnprísurin er óvanliga høgur í løtuni, og tí verður mælt til at nýta ein part av søluinntøkunum av jarni til at fíggja útskiftingina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. mai 2022:** Nevndin tekur undir við tilmælinum og heitir á umsitingina um at fáa øll rakstrartólini í verkstaðsskipanina hjá kommunala verkstaðnum og gera eina viðlíkahaldsavtalu.

**Ískoyti**
Í samband við samtyktina frá 3. mai 2022 verður neyðugt, at samtyktar verða flytingar millum kontur til tess at fáa til vega pening at keypa umrøddu maskinu. Hetta verður gjørt við at flyta kr. 2.000.000 av deild 7110 Renovation, konto 71010 Skrottviðgerð til deild 8375 Rakstrargøgn (Íløgur), nýggj konto: 'Nýggj maskina til tilfarshandtering'.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 7110 | 71020 | Skrottviðgerð | 8375 | | Nýggj maskina til tilfarshandtering | Ja | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 2.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 100.000 |

**Tilmæli:**
Teknsiski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini, leiðarin á Brennistøðini, leiðarin á Verkstaðnum og býarverkfrøðingurin mæla til at heimiðla verður at:

1. Peningur frá sølu av skrottjarni kr. 3.000.000 verður fluttur frá deild 7110 Renovatión, L71020 Skrottviðgerð til deild 8375 Rakstrargøgn, nýggj verkætlan 'Nýggj maskina til tilfarshandtering'.
2. Verkstaðið keypir inn maskinu sum lýst í málinum til nýtslu í Renovatiónini.
3. Gjørd verður viðlíkahaldsavtala millum Verkstaðið og Renovatiónina um hesa maskinu og øll onnur rakstargøgn í Renovatiónini

Mælt verður til at málið verður beint víðari í Býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir sum eykajáttanarmál.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Tikið av skrá.

## 288/22 Høli til frítíðarskúla og ungdómstilboð í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 17.08.2022 | 170/22 | 22/02376-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 195/22 | 22/02376-2 |
| 3 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 183/22 | 22/02376-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2022 | 206/22 | 22/02376-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 278/22 | 22/02376-2 |
| 6 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 258/22 | 22/02376-2 |
| 7 Mentamálanevndin | | | 22/02376-2 |
| 8 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 288/22 | 22/02376-2 |

**Upprunin til málið**
Samtykt frá mentamálanevndini tann 9. mars 2022 í máli nummar 22/00948 um útvegan av hølum til frítíðarskúla í Kaldbak

**Lýsing av málinum**
Neyðugt er at útvega frítíðarskúlanum og ungdómstilboðnum í Kaldbak nýggj høli. Til fyri kortum hevur frítíðarskúlin og ungdómstilboðið hildið til í Flatnagarði, sum er dagstovnur. Flatnagarður rúmar tó ikki øllum børnunum, og tí hevur frítíðarskúlin í eina tíð verið í skúlanum.

Hetta hevur víst seg ikki hepnast so væl, tí frítíðarskúlavirksemið ávirkar undirvísingina, og at umstøðurnar annars ikki eru so væl egnaðar til námsfrøðiliga virksemið.

Hetta skúlaárið verða tað skúlaár 16 frítíðarskúlabørn. Í Kaldbaks skúla verður forskúli eftir summarsteðgin, og við hesum verður frítíðarskúlin fyri fýra floksstigum. Hesi rúmast ikki í verandi hølum í skúlanum, ei heldur á dagstovninum.

Átroðkandi tørvur er tí at fáa loyst hølisspurningin fyri frítíðarskúlan og ungdómstilboðið í Kaldbak, soleiðis at hetta kann standa klárt eftir summarsteðgin.

Viðvíkjandi varandi loysn, so er eftir ástaðarfund, har umboð fyri bygingsdeildina, barna- og ungdómsdeildina, dagstovnaleiðalran o.ø. vóru við, semja um, at besa besta loysnin er at útvega ella byggja lonir, sum eru í umhvørvinum við skúlan, nýggju høllina og spæliplássið. Hóast at talan er um tvær verkætlanir, so er vert at kanna, um bygging av frítíðarskúla og høll kann samskipast í ávísan mun.

Komandi skúlaár verða 16 næmingar í frítíðarskúlanum. Fyri at tryggja, at ein loysn eisini heldur í fleiri ár fram, ið kann lofta einum vaksandi barnatalið í Kaldbak, verður mett neyðugt at byggja høli, sum kunnu rúma upp til 26 næmingum.

Samstundis vil ein hølisloysn til frítíðarskúlan og ungdómstilboðið eisini gera, at trýstið á dagstovnin minkar.

Sum fyribilsloysn er semja við samkomuna Nazareth um leigu av hølum til frítíðarskúla. Hetta er beint við skúlan. Leigumál verður lagt fyri fíggjarnevndina (mál 22/03249).

**Krøv til nýggj høli**
Neyðugt er við einari loysn, sum kann rúma upp til 26 frítíðarskúlanæmingum, umframt starvsfólkum og ungdómsklubbanum.

Ein hóskandi loysn má tí í minsta lagi innihalda inngongd og garderobu, har tað er lætt at lata seg í/úr útiklæðum, tvey vesi til børnini, tvey rúm, har eitt er felagshøli og hitt aktivitetsrúm/verkstaður, køk ella køksøki í felagshølinum, starvsfólkarúm og starvsfólkavesi. Umframt hetta er eisini neyðugt við rúmi til reingerð og tekniskar installatiónir.

**Fyrireikingar**
Bygningsdeildin hevur mett tørv á játtan í sambandi við fyrireikingar til útbjóðing av verkætlanini í heildararbeiðstøku. Mett verður, at upphædd kr. 300.000 er nøktandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Leigumál Nazareth 22/03249)

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | Ja | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at játta kr. 300.000 til fyrireikingar og at fáa til vega kostnaðarmeting av nýggjum hølum til frítíðarskúla og ungdómstilboð í Kaldbak av løgukarmi LK31015 Tillagingar á dagstovnaøkinum til nýggja løgukontu Frítíðarskúli í Kaldbak, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið. Harumframt verður mælt til at beina staðseting av hesum bygningi í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndinin og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við broyting av byggisamtykt og staðseting av nýggjum hølum til frítíðarskúla og ungdómtilboð í Kaldbak hevur Býarskipanardeildin fingið málið til ummælis.

Ráðgevar hava gjørt uppskot, har bygningur til frítíðarskúla og ungdómstilboð er staðsettur vestanfyri skúlan og vøllin, og norðanfyri ætlaðu ítróttarhøllina, sí viðheftu *Støðumynd*.

Frítíðarskúlin, høllin, skúlin og vøllurin eru skipað kring eitt felags útiøki/torg, og verður henda skipanin av økinum mett at kunna vera við til at skapa eitt gott og trygt umhvørvi fyri børn og ung, mentan og ítrótt, miðskeiðis í bygdini, við møguleika fyri eini góðari samvirkan millum tey ymisku virksemini. Torgið, ið verður formað av bygningunum kring tað, kann virka sum eitt savningarstað fyri Kaldbaksfólk til ymisk tiltøk, t.d. jólatræshald.

Fyri at skipa økið so sum uppskotið vísir, er neyðugt, at kommunan ognar sær umleið 890 $m^2$ frá Búnaðarstovuni afturat tí, sum avtala longu er gjørd um. Um prísurin verður sammettur við prísin, kommunan keypti lendi til høllina í sama øki fyri, verður samlaði kostnaðurin áleið 200.000 kr fyri teir 890 $m^2$..

Harumframt má byggisamtyktin fyri Kaldbak broytast sambært uppskotinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at samtykkja:
- uppskotið til skipan av økinum smb. skjali *Støðumynd*.
- at broyta byggisamtyktina fyri økið smb. skjali *Eftir broyting.*
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendi.
- og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og mentamálanevndina.

**Ískoyti:**

Fyri at skipa økið so sum uppskotið vísir, er neyðugt, at kommunan ognar sær umleið 880 $m^2$ frá Búnaðarstovuni afturat tí, sum avtala longu er gjørd um.

Samlaður kostnaður til keyp av lendi frá Búnaðarstovuni og til avtalu við festara, er mettur til 200.000,- kr.

Viðmerkjast skal, at kommunan hevur biðið um eina tilsøgn frá Búnaðarstovuni, men hevur enn ikki fingið hesa tilsøgn.

Fyriliggjandi meting er út frá fermeturprísinum tá seinasta avtala var fingin í lag við Búnaðarstovu og festara.

## Tilmæli:

Trivnaðarstjórin, kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa lendið uml. 880 m2, frá Búnaðarstovuni og endurgjald fyri ein samlaðan kostna á 200.000,- kr., at fíggja av konto 3175 Barnaansing LK31015 Tillagingar á dagstovnaøkinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmælið til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini hin 7. November 2022.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

# 289/22 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2022 | 72/22 | 22/00463-1 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 28.03.2022 | 3/22 | 22/00463-1 |
| 3 Havnanevndin | 05.04.2022 | 13/22 | 22/00463-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 144/22 | 22/00463-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 159/22 | 22/00463-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2022 | 222/22 | 22/00463-1 |
| 7 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 289/22 | 22/00463-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* er samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

Flestu bygdirnar í kommununi hava sína egnu serstøku byggisamtykt, men Kollafjørður kemur undir ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini og mett verður, at tað skal hon framhaldandi gera, av tí at talan er um størstu bygdina í kommununi, ið er meira býarkend, og nær høvuðsstaðnum. Soleiðis verður tað í hesum málinum einans býarskipanin (kortið), ið verður endurskoðað, og ikki sjálvar ásetingarnar í byggisamtyktini. Ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini vórðu endurskoðaðar í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktum – almenna- og serstakar byggisamtyktir.*

**Lýsing av málinum**
Tær flestu broytingarnar í býarskipanini í Kollafirði eru tillagingar, soleiðis at byggisamtykt og matrikulmørk fylgjast. Aðrar broytingar eru t.d. broyting av C3 miðstaðaøkinum við bátahylin við Sjógv, ið verður mælt til at broyta til B2 havnaøki, E neystaøki og A1 sethúsaøki, av tí at hetta verður mett at hóska seg betur til økið. Somuleiðis verður mælt til, at C1 miðstaðarøkið í Homrum verður broytt til eitt A1 øki, av tí at sethús eru í øllum hesum økinum.

Allar broytingar, og stutt viðmerking til broytingarnar, eru at síggja í skjalinum *Kollafjørður – broytingar*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kollafjørður er fevndur av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Endurskoðan av byggisamtyktum – almenna- og serstakar byggisamtyktir, journal nr. 17/02748.*
- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum**
Broytingarnar fyri havnaøkini eru gjørdar í samráð við Havnaskrivstovuna.

**Skjøl**

- *Kollafjørður – broytingar,* journal nr. 22/00463-3.
- *Kollafjørður – áðrenn broyting,* journal nr. 22/00463-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð smb. skjalinum *Kollafjørður – broytingar*, og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí ynski, at víðka neystaøkið úteftir undir matr. nr. 329 og at fáa samtyktu broytingina við matr. nr. 47 við, umframt at broyta part av matr. nr. 257c, sunnan fyri verandi havnaøki, til vinnuøki.

**Kollafjarðarnevndin 28. mars 2022:**
Staðbundna nevndin mælir til fylgjandi tillagingar:
- Broyting 1 í B2 øki: Nevndin ynskir ikki, at økið verður broytt til havnaøki og ynskir at økið verður eitt trivnaðarøki.
- Broyting 4 í B2 øki: Nevndin mælir til, at økið verður broytt til eitt vinnuøki, umframt at vinnuøkið verður víðkað til kaikantin.
- Taka undir við at broyta part av matr. nr. 257c til vinnuøki og víðkast til at fevna um økið, ið ikki er asfalterað.
- Nevndin tekur undir við hinum broytingunum.

**Ískoyti frá Tórshavnar havn**
Víst verður til samtyktina í Byggi- og býarskipanarnevndini hin 7.mars 2022 um ynski at broyta part av matr. 257 C til vinnuøki (økið sunnanfyri asfalteraða og innhegnaða økið).
Økið er partur av havnaøkinum á Oyrareingjum. Havnaøkið minkar sostatt við umleið eini helvt og missir munandi av virði sínum sum havn, um nevndi parturin av økinum verður broyttur til vinnuøki.

Hóast hesin parturin av havnaøkinum enn ikki hevur verið brúktur til havnarrelaterað virksemi, hevur tað tó sera stóran týdning fyri Tórshavnar havn sum ein framtíðar tilfeingisdepil í Norðurhøvum at hava eitt slíkt økið, ið er staðsett beint við eina djúphavn við góðari stórari rampu, tøkt at kunna bjóða fram til shippingvinnu av ymsum slag.

Tað er umráðandi fyri eina havn at altíð at hava økir tøk til virksemi, ið hevur tørv á flutningi umvegis bryggjukant. Alt havnaaøkið í Tórshavn er í løtuni avsett og í nýtslu til verandi virksemi hjá verandi kundum. Á Sundi er "gamla" havnaøkið næst við bryggjuni í nýtslu alt sum tað er, meðan helvtin av nýggju útfyllingini eystureftir á Sundi er útleigað. Sostatt eru nærum eingi tøk øki eftir á verandi havnaøkjum til at kunna viðka um virksemi, um og tá ið tørvur verður á tí, t.d. sum komandi tilfeingisdepil.

Strandalinjan í Tórshavnar kommunu, har ið til ber at staðseta góð havnaløg, er avmarkað, og tí er tað umráðandi, at fáu havnaløgini verða nýtt skynsamt og einans til virksemi, ið hevur tørv á flutningi umvegis bryggjukant ella sambandinum við sjógvin. Onnur vinna, ið ikki hevur hendan tørvin, eigur heldur at verða staðsett aðrastaðni enn við havnaløgini.

**Tilmæli**
Havnarmeistarin mælir havnanevndini til at taka undir við upprunauppskotinum um endurskoðaða byggisamtykt sambært skjalinum *Kollafjørður – broytingar*, men mælir samstundis havnanevndini frá, at partur av matr. nr. 257c (økið sunnanfyri asfalteraða og innhegnaða økið) verður broytt til vinnuøki.

**Havnanevndin 05. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting at verandi havnaøki verður varðveitt sum havnaøki við matr.nr.257c.

**Ískoyti:**
Í smb. við politisku viðgerðina av uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð, eru ymiskar broytingar samtyktar.

Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 7. mars 2022 varð samtykt at:
1. Víðka neystaøkið úteftir undir matr. nr. 329.
2. Fáa samtyktu broytingina við matr. nr. 47 við.
3. Broyta part av matr. nr. 257c sunnan fyri verandi havnaøki til vinnuøki.

Á fundi í Kollafjarðanevndini hin 28. mars 2022 varð mælt til, at:
4. Broyting 1 í B2 økinum (bátahylurin í Líðini) verður varðveitt sum eitt trivnaðarøki og ikki broytt til eitt B2 havnaøki.
5. Broyting 4 í B2 økinum verður broytt til eitt vinnuøki ístaðin fyri havnaøki, og at vinnuøkið verður víðkað yvir til kaikantin.
6. Taka undir við at broyta part av matr. nr. 257c til vinnuøki og víðkast til at fevna um økið, ið ikki er asfalterað.

Á fundi í Havnanevndini hin 5. apríl 2022 varð samtykt at:
7. Verandi havnaøki við matr. nr. 257c verður varðveitt sum havnaøki.

Til hetta hevur umsitingin hesar viðmeringar:
Ad. 1. Tikið verður undir við hesi viðmerking.
Ad. 4. Tikið verður undir við hesi viðmerking, men mælt verður til, at økið verður eitt C1 øki ístaðin fyri C3 øki. Munurin á ásetingunum í teimum báðum økjunum er, at C1 er lagt til miðstaðabygging og C3 er lagt til miðstaðabygging, skúlar og íbúðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja punkt 1, 2 og 4, at nevndin tekur støðu til punkt 3, 5, 6 og 7 og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir tilmælinum frá umsitingini, punkt 1, 2, og 4, og við punkt 7.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð hevur ligið til almenna hoyring frá 11. august 2022 til 22. september 2022. Í tí sambandi komu 6 hoyringsskriv, og eru hesi viðgjørd niðanfyri.

Trý av hoyringsskrivunum snúgva seg um sethús/matriklar, ið liggja í D1 fríøkjum, og verða hesi viðgjørd saman. Talan er um viðheftu skriv *Viðmerking - matr. nr. 25, Viðmerking – matr. nr. 199f* og *Viðmerking – matr. nr. 211b.* Niðanfyri er ein samandráttur av hesum, og viðmerkingar frá umsitingini.

**Matr. nr. 25**
Í 2019 søkti táverandi eigari av matr. nr. 25 í Kollafirði um at broyta byggisamtyktina fyri matrikulin frá at vera D1 øki til A1 øki.

Umsóknin var grundað á ynskið um at umvæla og byggja ognina út. Húsini vóru lág, ov lítil til eina fastbúgvandi familju og eingin vegur var til húsini.

Umsóknin varð ikki gingin á møti við tí grundgeving, at ynskið var at varðveita fríøki og at verja gomul bygdarløg í ávísan mun. Í málslýsingini varð víst á strukturin á byggisamtyktini í økinum, har grønir geirar eru planlagdir ímillum og oman fyri bústaðarøki. Endamálið við D1 geirunum var at stýra bygging til tess at fremja heildarmyndina og grannalagskensluna í Kollafirði. Húsini eru frá 19'indu øld og liggja í einum serstøkum gomlum bygdarlagi – tó ognin ikki er friðað.

Síðani umsóknina um broyting av byggisamtyktini í 2019, er ognin seld, og nú uppskot hevur ligið til hoyringar um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð, ynskir nýggi eigarin av ognini, at umsóknin frá 2019 verður endurviðgjørd.

**Matr. nr. 199f**
- Ynskja at matr. nr. 199f verður broyttur frá D1 øki til A1 øki.
- Húsini eru í ivasomum standi, óheppið innrættað og ov lítil til familjuna upp á 5.
- Eru fegin um grøna økið húsini standa í og vistu av hesum tá tey fyri 2 árum síðani keyptu húsini, men hava fyri neyðini at fáa lagt eitt lítið sindur afturat húsunum.
- Viðmerkja, at talan er um sama matrikul, sum royndarholið hjá Jarfeingi og Tórshavnar kommuna er grava á, í smb. við heitu kelduna.
- Hava spurt seg fyri um nakar veit um friðingina, hvat liggur aftanfyri ella hvussu hon er farin fram, men eingin kennir til hana og eingin kennir til nakra hoyring. Man hevur smoygt eina friðing niðuryvir einstaklingar, uttan at tey hava vitað av tí.
- Ongar greiðar grundgevingar fyri, hví økið varð broytt.
- Víst verður á, at í øðrum tilíkum D1 økjum í Kollafirði, tykist tað sum at endamálið hevur verið, at binda saman traðir við bygdavegin. Hinir líkandi D1 geirarnir eru tó minni, enn geirin við matr. nr. 199f. Um man minkaði D1 geiran við at taka matr. nr. 199f (og 200) úr, so varð endamálið við geiranum framvegis rokkið, og fór at líkjast meira hinum líknandi D1 geirunum.
- Sær út sum, at talan hevur verið um ein feil, tá økið er lagt til D1 øki.

**Matr. nr. 211b**
- Ynskir at parturin av matr. nr. 211b, sum er umráðispartur D1, verður broyttur til A1. Er ikki áhugaður í at partur av stykkinum skal vera til almenning og metir ikki, at tað eigur at vera friðað.
- Um kommunan ikki er einig í hesum, er hon vælkomin at keypa økið.

**Viðmerkingar frá umsitingini**
Eins og nevnt varð í fyrru viðgerð av umsókn um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 25, so eru umrøddu grønu geirarnar, sum ognirnar matr. nr. 25, 199f og 211b allar eru partar av, ein gjøgnumgangandi strukturur í Kollafirði. Teir stava allir frá áðrenn kommunurnar vórðu lagdar saman, og í skjølunum sæst, at ætlanin við teimum er, at varðveita grannaløgini og bygdaidentitetin, og atskilja grannaløgini við fríøkjum ímillum. Tað at D1 økini eru løgd oman á verandi sethús leggur nakrar óhepnar bindingar á ognirnar, men fremja tann ynskta býarskipanarliga strukturin, ið er við til at varðveita bygdadámin í Kollafirði.

Um sethús liggja í D1 øki verður tað loyvt teimum at viðlíkhalda húsini og gera neyðugar ábøtur, men loyvt verður ikki, at vaksa um rúmdina á húsunum. Tað eru fleiri dømi um sethús, ið liggja í D1 øki í Tórshavnar kommunu – uml. 8 í Kollafirði og Signabø.

Trý av hoyringsskrivunum snúgva seg um havnaøki, og verða hesi viðgjørd saman. Talan er um viðheftu skriv *Viðmerking – Kollafjarðarnevndin, Viðmerking – Páll Danielsen* og *Viðmerking – matr. nr. 296.* Niðanfyri er ein samandráttur av hesum, og viðmerkingar frá umsitingini.

**Kollafjarðarnevndin**

- Mótmælir harðliga byggisamtyktini.
- Kollfjarðarnevndin hevur seinastu tvey árini víst á óskili og óruddi á matrikklunum 257a á Oyrareingjum og partar av 230a, sum Tórshavnar havn varðar av. Økini hava verið órøkt í fleiri ár og ikki verið brúkt til sørt annað enn órudd og óskil. Hava skotið upp, at hesi økið verða gjørd til vinnuøki.
- Serliga matr. nr. 257c á Oyrareingjum hevur stórt potentiali og upplagt til vinnuvirksemi. Økið er mitt í landinum, planerað, tætt við havnavirksemi og stórt til víddar.
- Partur av matr. nr. 230a er beinleiðis vandamikið at ferðast á, tí órudd, bilar og konteynarar eru allastaðni. Tilvildarlig brúka økið til teirra fyrimun uttan treytir.
- Upprunaliga vóru hesi øki vinnuøki, men vóru broytt til havnaøki eftir kommunusamanleggingina. Tórshavnar havn hevur ongantíð gagnnýtt, skipað ella røkta økini.
- Kollfjarðarnevndin varð tikin upp á ráð, nú byggisamtyktin skuldi endurskoðast, og víst var á viðurskiftini við havnaøkjunum, men nú byggisamtyktin liggur til hoyringar, so eru økini varðveitt sum havnaøki.
- Tað er komið fram, at orsøkin til at tilmælið frá Kollfjarðarnevndini ikki er gingið á møti, er tí at umsókn er komin til Tórshavnar havn um at brúka økið til havnavirksemi. Kollfjarðanevndin undrast staðiliga á ein slík umsókn kemur í síðstu løtu og kann hava so stóra ávirkan, at økið verður varðveitt sum havnaøki, ímóti tilmælinum hjá staðbundnu nevndini, sum umboða yvir 1000 fólk í økinum.

**Páll Danielsen**

- Spurnatekin verður sett við hvussu kommunan kann loyva, at bygt verður útum mark í tí gomlu byggisamtyktini. Hetta tykist sum ein vánalig roynd at dekka yvir feilir sum eru gjørdir fyri nógvum árum síðani. "Tað kemur til tankar at hetta er ein strategi sum er løgd við vilja fyri at spakuliga yvirtaka allan fjørðin til havnaøki og samstundis er hetta við til at reka fólk av bygd vegna larm." Víst verður til broyting 1 í B1 økjum og broyting 4 í B2 økjum.
- Tað letur til at kommunan roynir at krógva sínar egnu feilir við at taka tey økini sum eru farin útum mark við uppí ta nýggju samtyktina.
- Broyting 4 fer at at økja um larmin frá skipum og virksemi á fjørðinum. Hetta er vánaligt fyri trivnaðin hjá teimum, sum búgva á fjørðinum.
- Metir tað vera positivt við broytingum av byggisamtyktini til neystagrundir og sethúsaøkir á Signabø og á fjørðinum sum heild, men tað nyttar lítið tá eingin vil vera har grundað á nógva larmin frá ídnaðarøkjunum.
- Havnaøkið hevur ikki verið røkta og skipað á ein hátt sum er til gleði ella nyttu og tí verður mett, at Tórshavnar havn er óbúgvin at taka sær av økinum.
- Tekur undir viðmerkingunum frá Kollafjarðanevndini um, at økið, ið ikki verður røktað av Tórshavnar havn (økið uttanfyri hegnið), verður broytt til vinnuøki.

**Matr. nr. 296**

- B1 havnaøkið suðuri á Oyrini á Signabø eigur at verða avtikið.
- Vinnuøkið varð staðsett fyri yvir hundrað árum síðani, og síðani eru fleiri onnur stór og betur egnaði vinnuøkir komin í Kollafirði.
- Økið hevur einki viðri sum vinnuøkið – ikki planerað (sum so), einki vatn, eingin el-veiting, eingin brúkiligur infrastrukturur og bert ein grúsvegur, sum bóndin eigur.
- Náttúruvakurt øki og søguligar leivdir frá tveimum hvalastøðum, sum vóru til í tjúgundu øld.
- Vegirnir á Signabø eru smalir og óegnaðir til stór og áhaldandi koyrandi vinnutól, um virksemi skuldi tikið seg upp á Oyruni.
- Økið hevur í fleiri ár verið brúkt av bóndanum á Signabø, og er eftirhondini eisini vorið ein integreraður partur av arbeiðinum hjá bóndanum. Í øðrum førum grundgevur kommunan víðkanir av byggisamtyktini við, at hon er í tráð við "veruliga virksemið" í økinum – tí eigur man eisini at kunnu minka/avtaka økir, har ið einki veruligt virksemi (samsvarandi byggisamtyktini) hevur verið í longri tíð.

**Viðmerkingar frá umsitingini**
Tað at staðseta bústaðarøki og havnaøki, við virksemi, ið hava høga ljóðdálking, er yvirskipað ikki skynsam býarskipan. Tá nýggj havnaøki/vinnuøki verða skipað og staðsett, eru ymiskar vegleiðingar, ið verða fylgdar, t.d. vegleiðing um umhvørvisflokkin, ið vegleiðir um, hvør hóskandi frástøða er millum ávíst vinnuvirksemi og bústaðir.

Tá kemur til verandi býir og bygdir, og virksemi í hesum, er tað tó ikki altíð møguligt at fylgja vegleiðingunum. Natúrliga dynamiska býarmenningin gevur ein strukturur, har vinnan og bústaðarøkini vaksa saman, og er hetta ein gongd, ið sæst aftur í nógvum býum og bygdum.

Havnaøkið eru orkukrevandi at útvega og tí verður tað mett skynsamt, at lata tey øki, ið eru egnað til havnavirksemi, at verða útløgd til hetta.

Tá havnaøkið – og býarøki annars, verða víðkað, er rætta mannagongdin tann, at byggisamtyktin verður broytt áðrenn økini verða inntikin, og er hetta eisini ein mannagond, ið vanliga verður fylgd. Í partum av havnaøkjunum í Kollafirði og á Oyrareingjum er hetta tó ikki støðan, men nú økini eru útbygd og nýtt til havnaendamál, eigur byggisamtyktin fyri økini at vera broytt, soleiðis at hon samsvarar við virksemið.

Í mun til hvussu økið verður nýtt og røkta, so verður tað ikki mett vera eitt byggisamtyktarmál, men tað er sjálvsagt óheppið fyri økið og býarmyndina at kommunal øki liggja í órøkt.

Viðvíkjandi havnaøkinum suðuri á Oyrini á Signabø, so tekur umsitingin undir við, at havnaøkið eigur at vera avtikið. Har er í dag ikki etablerað havnavirksemi í økinum, og tað verður ikki mett hóskandi, at draga ferðslu og virksemi, sum eitt havnaøki viðførir, gjøgnum Signabø og eftir grúsvegnum. Umsitingin hevur somuleiðis umrøtt málið við Havnaskrivstovuna, sum vísir á, at ongar framtíðarætlanir liggja í kortunum at byggja havnalag í hesum økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð við teirri broyting, at B1 havnaøki suðuri á Oyrini á Signabø verður avtikið, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

# 290/22 Varðveitingarverd øki og bygningar í kommununi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2022 | 227/22 | 22/06945-1 |
| 2 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 290/22 | 22/06945-1 |

**Upprunin til málið**
Í Tórshavnar kommunu standa fleiri søguligir og sjáldsamir bygningar og øki, sum eru verd at varðveita og ansa eftir av ymsum orsøkum. Varðveitingarverdir bygningar og øki eru ofta týdningarmikil og samfeldir partar av sermerktu byggilistini í kommununi. Teir kunnu hava týdning fyri grannalagið og heildarmyndina í býnum.

Tað er týdningarmikið fyri framtíðina at tryggja tílíkar bygningar og øki, tí teir hava byggilistarligt, býarskipanarligt og mentunarsøguligt virði, og eru við til at mynda samleikan í kommununi.

Í 2006 varð ein skráseting gjørd av bygningum, sum eru bygdir áðrenn 1958. Bygningarnir fingu ásett eitt varðveitingarvirði, og arbeiðið er skjalfest í Tórshavnar býaratlassi. Býaratlassið verður brúkt sum eitt vegleiðandi býarskipanarligt amboð, men tað virkar ikki sum ítøkilig heimild í viðgerðini av t.d. byggimálum, har ætlanin er at broyta bygningar móti tilmælunum í Býaratlassinum.

Tað er av alstórum týdningi, at Tórshavnar kommuna fær eitt amboð, ið kann verða nýtt til frama fyri at varðveita serstøku byggilistina, býarskipanina og mentunarsøguligu virðini í kommununi, áðrenn ov seint er.

**Lýsing av málinum**
Tá tosað verður um at varðveita byggilistina og serlig býarskipanarlig øki í kommununi, er endamálið antin at varðveita eitt einstakt punkt – ein bygning o.l. ella at varðveita øki – grannaløg o.l.:

- **Punkt**
  Tá talan er um at varðveita einstøk punkt í býnum, er talan oftast um einstakir bygningar, ið ynskið er at varðveita grundað á sína serstøku byggilist ella mentunarsøguliga virði. Bygningar bygdir áðrenn 1958 hava í Tórshavnar býaratlassi allir fingið eitt varðveitingarvirði, og eiga hesi at verða vird, tá umsóknir koma um at broyta ella taka niður bygningar, ið eru skrásettir sum varðveitingarverdir. Varðveitingarvirðini eru ymisk (Skrásett smb. SAVE skipan), og eigur hvørt mál at vera viðgjørt í mun til, hvussu høgt varðveitingarvirði er, og hvat sermerkir ítøkiliga bygningin.

  Fyri at heimild skal vera at nýta skrásetingina í Býaratlassinum í ítøkiligum byggi- og býarskipanarmálum, eigur Býaratlassið at verða staðfest í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Í Almennu byggisamtyktini eigur at verða víst til, at bygningar skrásettir í Býaratlassinum, skulu viðgerast á serligan hátt, og skal viðgerðin av málinum, taka støði í, hvussu høgt varðveitingarvirði er. T.d. kundi verði ásett, at í bygningum, ið eru skrásettir við høgum varðveitingarvirði, ber ikki til at umvæla, soleiðis at tað, ið ger bygningin varðveitingarverdan, verður burtur. Bygningar, ið hava miðalhøgt varðveitingarvirði kunnu umvælast, tó so at teir skulu halda seg til upprunan, og bygningar við lágum varðveitingarvirði, kunnu frítt umvæla, smb. vanligum galdandi reglum.

  Í hesum sambandi eigur Tórshavnar býaratlas at verða dagført og útbygt, soleiðis at skrásetingarnar, ið eru gjørdar, verða dagførdar, umframt at skrásetingarnar verða útbygdar til somuleiðis at fevna um nýggjari bygningar.

- **Øki**

  Tá talan er um at varðveita einstøk øki í býnum, er talan oftast um avmarkaði øki, ið ynskið er at varðveita grundað á, byggilisitina, mentunarsøguliga virði ella býarskipanarliga virði, økið hevur sum ein heild – altso er tað ikki neyðturviliga einstøku bygningarnir, í økinum, ið hava eitt serligt virði, men økið sum heild og dámurin í økinum.

  Fyri at varðveita serstøku økini, eiga serstøk byggisamtykt at verða gjørd fyri hesi. Ymiskt er, hvat tað er, ið ger hesi økini serstøk, og eigur hetta at verða greitt lýst og grundgivið fyri. Grundað á eina greining av økinum, skulu ásetingar gerast fyri økið, hvørs endamál er at varðveita tað, ið er serstakt fyri økið.

  Tað eru fleiri øki í kommununi, ið eru verd at varðveita, men av tí at tað er orkumikið at fara í hált við at fremja tílík átøk í verandi økjum, eigur ein raðfesting at verða gjørd av, hvørji øki man fyrst eigur at fara í hált við at gera varðveitandi ásetingar fyri.

  Dømi um øki, ið eiga at verða í fremstu raðfesting eru:
  Kilarakanalin
  Tróndargøta/Bøgøta
  Rabarbukvarterið
  Jóannesar Patursonargøta
  Tinghúsvegurin
  Gríms Kambansgøta
  Túnini

  Nýggjari øki, ið somuleiðis eiga at verða varðveitt:
  Tórsbyrgi
  Berjabrekka
  Miljum Gilja
  Inni á Gøtu
  Konmansmýra
  Serstøk øki í bygdunum eiga somuleiðis at verða varðveitt

**Amboð**

Býarskipanarliga amboðið, ið verður nýtt at regulera bygging fyri avmarkaði øki, eru byggisamtyktir. Í serstakari byggisamtykt ber til at gera byggiregulerandi ásetingar fyri øki, hvørs endamál er at varðveita dámin í økinum.

Viðvíkjandi einstøkum bygningum, so verður mælt til at gera áseting í almennu byggisamtyktini, ið vísir til Tórshavnar býaratlas, har ásetingar eru, hvussu bygningar skulu handfarast, alt eftir, hvussu høgt varðveitingarvirði teir hava.

Tórshavnar býaratlas varð gjørt í 2006 og er ein skráseting av bygningum, sum eru bygdir áðrenn 1958. Bygningarnir hava fingið eitt varðveitingarvirði millum 1-9, og er hetta gjørt sambært skrásetingarskipanini SAVE. Skrásetingar sambært SAVE skipanini taka støði í fimm ymiskum atlitum; Byggilistarligt virði, mentunarsøguligt virði, umhvørvisligt virði, upprunanum og standinum.

Bygningar við varðveitingarvirði 1 eru allir friðaðir sambært Løgtingslóg um friðan av fornminnum og bygningum. Bygningar, ið hava varðveitingarvirði millum 2-3 hava høgt varðveitingarvirði, bygningar við varðveitingarvirði 4-6 hava miðal høgt varðveitingarvirði,og bygningar við varðveitingarvirði 7-9 hava lágt varðveitingarvirði.

**Avleiðingar**
At varðveita øki og bygningar hevur heilt víst stóran týdning, bæði fyri býin sum heild, men eisini fyri borgarnar, ið búgva í umrøddu økjum. Tað eru fleiri dømi um øki og bygningar hvørs virði hækkar, tí at tað hevur ein greiðan struktur, og dámur, uppruna byggilist og søga eru varðveitt. Av tí at bygging í varðveitingarverdum økjum møguliga fáa fleiri avmarkandi ásetingar at fylgja, er tó møguligt, at endurgjaldskrav verður reist, grundað á meira avmarkaðar møguleikar fyri bygging. Mett verður tó, at hetta er nakað ið hevur týdning at raðfesta, og fer í framtíðini at hava ómetiligt virði fyri kommununa.

Arbeiðið at endurskoða býaratlassið, at skráseta bygd øki og gera serstakar byggisamtyktir er somuleiðis tíðarkrevjandi, og um tað skal vera framt við skili innan eina rímiliga tíð, má hóskandi arbeiðsorka setast av til fremja arbeiðið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. Mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir.

Av tí at tað ikki er siðvenja í Føroyum at gera tílíkar ásetingar viðvíkjandi varðveiting av bygningum og økjum, eigur fundur at verða millum umsitingina hjá Tórshavnar kommunu og umsitinga hjá avvarðandi málaráðið, soleiðis at semja er um leistin, arbeitt verður eftir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at umrøða og samtykkja, at:
- Umsitingin arbeiðir víðari við at kanna viðurskiftini fyri at fara undir eina dagføring og útbyggjan av Tórshavnar býaratlasi við tí endamáli at kanna møguleikarnar fyri at taka hetta í nýtslu í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
- Umsitingin byrjar arbeiðið at skráseta og raðfesta varðveitingarverd øki fyri at gera serstakar byggisamtyktir fyri hesi.
- Beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó so at málið ikki fer í býráðið, fyrr enn arbeiðið er komið longri.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>15. desember 2022 | Blað nr.: 1130 |
| | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Tikið av skrá.

# 291/22 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 807g, Tórshavn - Frá A1 til D3

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2022 | 228/22 | 22/07015-1 |
| 2 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 291/22 | 22/07015-1 |

**Upprunin til málið**
Mál 22/00894, har samtykt verður, at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera broyting í byggisamtykt fyri økið í sambandi við ætlanir um at byggja hádeild til Sankta Frans skúla í økinum.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at byggja skúlabygning til hádeild til Sankta Frans skúla á matr. nr. 807b, Tórshavn. Ætlanin er, at atkomuviðurskifti og parkering til nýggju hádeildina verða frá Varðagøtu og til matr. nr. 807g, ið er kommunal ogn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski.
- Byggistigið má ikki fara upp um 0,3.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús ella raðhús.

Ásetingar fyri D3 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.
- Byggistigið má fyri eitt náttúrligt avmarkað øki ikki fara upp um 0,25, og nýtslustigið ikki fara upp um 0,5.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Samráðst er við KFUK um avtalu, og gjørt er uppskot tí viðvíkjandi, har kommunan keypir umleið 230 $m^2$ av lendi til veg burtur av matr.nr. 807a, sí tekning, og fær KFUK-húsið í hesum sambandi tinglýstan óskerdan atkomurætt eftir vegnum til KFUK-húsið, og nýtslurætt til nýggja parkeringsøkið, sum verður gjørt á matr.nr. 807g.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Hølisloysn til nýggja hádeild í Sankta Frans skúla*, journal nr. 22/00894.
- *Sáttmáli um keyp av lendi matr. nr. 807a, KFUK,* journal nr. 22/06702.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri matr.nr. 807g, Tórshavn, frá A1 øki til D3 øki, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

# 292/22 Persónsupplýsingarpolitikkur fyri borgarar og starvsfólk

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 316/22 | 22/06962-1 |
| 2 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 292/22 | 22/06962-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært § 23 og 24 í LL um dátuvernd skal Tórshavnar Kommuna veita nøktandi kunning og gjøgnumskygni til borgarar og starvsfólk í samband við innsavnan og viðger av teirra persónupplýsingum. Partur av hesari kunning er persónupplýsingarpolitikkur fyri borgarar og persónupplýsingarpolitikkur fyri starvsfólk.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar Kommuna kunnar um persónupplýsingarpolitikk fyri borgarar á torshavn.fo, so allir borgarar hava møguleika at kunna seg um hendan. Øll starvsfólk skulu somuleiðis kenna henda politikk, og er hesin tí eisini lagdur á Vaglið til kunningar.

Persónupplýsingarpolitikkur fyri starvsfólk liggur á Vaglinum, har øll starvsfólk í TK hava møguleika at kunna seg um hendan.

Tórshavnar Býráð samtykti hesar politikkir tann 26/11/20.

Síðani tá eru bæði persónupplýsingarpolitikkur fyri borgara og persónupplýsingarpolitikkur fyri starvsfólk vorðin endurskoðaður í samband við ávísar tillagingar á dátuverndarøkinum í Tórshavnar Kommunu, og sambært krøvum frá Dátueftirlitinum.

Niðanfyri verða lýst høvuðstillagingarnar fyri ávikavíst persónupplýsingarpolitikk fyri borgarar og persónupplýsingarpolitikk fyri starvsfólk.

**Tillaging: Persónupplýsingarpolitikk fyri borgarar**

- Tillagingar eru gjørdar í mun til, hvussu borgarin kann samskifta við TK um dátuverndarviðurskifti. Hetta er gjørt sambært áseting í DVL § 23 stk. 1 nr. 2, har ásett er, at samskiftisupplýsingar hjá dátuverndarfólkinum skal vera sjónligt fyri skrásetta (borgarin) s. 1.
- Talva er sett inn, sum greiður skrásetta frá bólking av persónupplýsingum, sum TK viðgerð fyri at loysa sínar uppgávur s. 2
- Fyri at fremja gjøgnumskygni og lýsa betur, hvar upplýsingar verða savnaðar frá, hevur TK sett inn talvu, ið lýsir fyrisitingina í Tórshavnar Kommunu s. 3 og 4.
- Sum nakað nýtt er lýsing um endamálið við nýtslu av vakmyndatól sett inn s. 4
- Avsnitt um hvussu leingi TK goymir upplýsingar hjá skrásetta er styrkt og útbygt til eisini at umfata striking av myndum í vakmyndatólum sambært LL um vakmyndatól
- Avsnitt er sett inn um rættin, ið skrásetti hevur um upplýsingar um skrásetta eru latnar víðari til 3. part sambært § 30 í DVL

Tillaging: Persónupplýsingarpolitikk fyri starvsfólk

- Tillagingar eru gjørdar í mun til, hvussu starvsfólki kann samskifta við arbeiðsgevaran (TK) um dátuverndarviðurskifti. Hetta er gjørt sambært áseting í DVL § 23 stk. 1 nr. 2, har ásett er, at samskiftisupplýsingar hjá dátuverndarfólkinum skal vera sjónligt fyri skrásetta (starsfólki) pkt.1.1.

- Endamál og nýtsla av persónupplýsingum er tillagað til millum annað at umfata umbøn um tænastuferðir og avrokning av sama, GPS-tracking skipanir, vakmyndatól, umbøn um barnaváttanir og skráseting av persónupplýsingum hjá starvsfólki á torshavn.fo pkt. 2
- Avsnitt um um barnaváttanir, sum TK er áløgd at umbiða við støði í LL nr. 80 frá 6. Mai 2022 um barnaváttanir pkt. 2.1
- Kunnað verður um, í hvørjum sambandi upplýsingar hjá starvsfólkum verða skrásettar í skipanum hjá TK. Pkt. 2.2
- Starvsfólk verða kunnaði um vakmyndatól og endamálið við teimum umframt, at TK hevur mannagongd fyri vakmyndatól pkt. 2.3
- Starvsfólk verða kunnaði um GPS-tracking og endamálið við teimum, og víst verður á, at TK hevur mannagongd fyri GPS-tracking pkt. 2.4
- Kunnað verður um, at TK eftirkannar loggar sambært mannagongd fyri eftirkanning av l oggum pkt. 3
- Kunnað verður um samtykki í tann mun TK hevur tørv á hesum, umframt samtykki til barnaváttanir pkt. 6 og 6.1
- Avsnitt 7.1 um hvussu leingi TK goymir persónupplýsingar hjá starvsfólkum er tillaga til at umfata kunning um avhending av upplýsingum til Tjóðskjalasavnið, sambært LL um skjalasøvn.
- Kunning um hvørjar keldur TK nýtir til innsavnan av persónupplýsingum hjá starvsfólkum er umfatar kunning um, at í samband við LL um barnaváttan § 2 stk. 1, fær TK eina váttan við teimum upplýsingum, ið eru nevndar í § 36 í BKG for Færøerne om behandling af personoplysninger i Det Centrale Kriminalregister (Kriminalregisteret) pkt. 8
- Starvsfólk verða kunnaði um, at TK í ávísum førum nýtir dátuviðgerar pkt. 9.1
- Starvsfólk verða kunnaði um, at TK nýtir tænastu- og keypsportalar til umsiting í samband við rakstrararbeiði, eitt nú netbankar, samskiftistænastur, starvslýsingarportalar, har persóndátur hjá starvsfólkum verða skrásettar. Kunnað verður um, at TK skal hava skrivligar mannagongdir fyri, hvussu hesar upplýsingar verða strikaðar aftur tá endamálið við teimum er rokkið. Pkt. 9.2
- Pkt. 11 umhandlar hvussu starvsfólk handfer trygdarbrot
- Brot er sett inn um møguleika at kæra pkt. 12

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03628

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

Við støði í omanfyri nevndu tillagingum til verandi politikkir mæla kommunustjórin og fyrisitingarstjórin til, at taka undir við endurskoðaða persónupplýsingarpolitikkin fyri borgarar og persónupplýsingarpolitikkin fyri starvsfólk.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>15. desember 2022 | Blað nr.: 1136<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 293/22 Eykajáttan av meirinntøkum 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.11.2022 | 295/22 | 22/06615-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 269/22 | 22/06615-1 |
| 3 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 293/22 | 22/06615-1 |

**Upprunin til málið**
Inntøkurnar í 2022 eru hægri enn upprunaliga mett og gevur hetta møguleika fyri at hækka fíggjarætlanina í árinum. Eykajáttanir skulu vera samtyktar við 2. viðgerð innan 31. desember í fíggjarárinum.

**Lýsing av málinum**
Nýggjastu metingarnar av samlaðu inntøkunum fyri 2022 vísa, at meirinntøkurnar koma at verða umleið 76 mió.kr. 37 mió.kr av hesum, er staðfestar meirinntøkur av partafelagsskatti, sum er grundaður á ársroknskapirnar í 2021.

Kommunuskatturin verður mettur at blíva 17 mió.kr hægri enn mett upprunaliga. Haraftrat skal leggjast árliga reguleringin fyri árið fyri, ið vanliga kemur í oktober í inniverandi ári. Í ár er hon 15 mió.kr. Skatturin av eftirlønarinngjøldum verður mettur 8 mió.kr hægri enn upprunaliga mett.

Av mettu meirinntøkunum eru játtaðar 31,2 mió.kr. Aftan á hesar játtanir er eitt avlop á 45 mió. kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Borgarstjórin mælir til, at 45,1 mió.kr av meirinntøkunum fyri 2022 verða nýttar til at fíggja niðanfyri standandi løgur og rakstur.

| | |
|---|---|
| **Íløgur** | |
| Vøllur í Hoyvík | 5.000 |
| Høllin á Hálsi | 2.000 |
| Fótbóltsvallir, Argir-Hoyvík, Ljós | 3.000 |
| Lendisgøtur | 4.000 |
| Viðarlund í Dalinum langa | 7.000 |
| Smábátahavn Álakeri | 600 |
| Hoydalar | 1.000 |
| Dagføring kommunalir bygningar | 3.000 |
| | 25.600 |
| | |
| **Rakstur** | |
| 2460 Stuðul og verkætlanir innan almannamál | 500 |
| 4140 Skúlaætlan | 1.000 |
| 5365 Stuðul til ítrótt | 1.000 |
| 5370 Stuðul til íløgur | 5.500 |
| §5 Stuðul til størri listarligar verkætlanir | 1.000 |
| 6110 Dagstovnar garðar | 1.000 |
| 6110, Altan á Boðanesheiminum | 1.000 |
| 7311 Vinnuverkætlanir, Filmsvinnan | 1.000 |
| 7510 Bussleiðin | 2.500 |
| 7710 Ferðavinnan | 2.000 |
| 8112 Asfalt | 3.000 |
| **Íalt** | **19.500** |
| | |
| **Eykajáttan tilsamans** | **45.100** |

**Fíggjarnevndin 23. november 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið krevur tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Gunvør Balle, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til, at 10 mió. kr. av meirinntøkunum, ið eru settar av til íløgur, verða brúktar til at útvega fleiri dagstovnapláss.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari atkvøðu og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Jón Kragesteen, Turid Horn, Kristian Martin Skála, og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Ruth Vang.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Atkvøtt varð um málið við aðru viðgerð, og varð málið samtykt við níggju atkvøðum fyri, ongari ímóti og fýra blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam og Kristian Martin Skála.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle, Annika Olsen og Súsanna Olsen.

## 294/22 Náttúruøki í Dalinum Langa

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 98/22 | 22/01129-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.10.2022 | 194/22 | 22/01129-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2022 | 208/22 | 22/01129-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 306/22 | 22/01129-1 |
| 5 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 294/22 | 22/01129-1 |

**Upprunin til málið**
Ynski er um at gera Dalin Langa til eitt enn betur náttúruøki hjá borgarunum í eystara parti av Hoyvík at nýta til rekreatión.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at gera átøk í Dalinum Langa, sum fara at gera hetta fríøkið enn meira atkomuligt hjá borgarum at brúka sum rekreativt náttúruøki.

Dalurin Langi er í dag ein landslagskíli inn ígjøgnum býin, sum er útlagdur til at vera eitt D1 øki í almennu byggisamtyktini. Ein gøta gongur gjøgnum dalin frá Hoyvíkshøllini og niðan til vegin Klingruna. Men ynski er um geva enn betur atgongd til hetta náttúruøki og at gera tað til eitt enn betur uppihaldsstað hjá borgarunum í Hoyvík at brúka í sinum gerandisdegi.

Dalurin liggur væl fyri í eystara parti av Hoyvík og markar upp ímóti fýra býlingum, einum vinnuøki, einum skúla og ítróttarøki.

Ætlanin er at:
- gera fleiri gøtusambond, sum gera tað møguligt at ganga ein rundtúr í økinum og uppliva náttúruna
- gróðurseta fyri at skapa lívd og framhevja náttúrukensluna í økinum
- gera uppihaldspláss við ymiskum aktivitetum, t.d. náttúruspælipláss, útferðarpláss og annað

Eigarafelagið Hoyvíkshædd hevur fingið heimild at fara í gongd við at skipa norðasta part av dalinum til eitt býlingsfríøki hjá teimum. Hetta arbeiðið er ávegis at fara í gongd. Umboð fyri eigarafelagið hava verið á fundi við umsitingina, har niðurstøðan var at samstarva um endaliga úrslitið av fríøkinum, soleiðis at tað somuleiðis fór at verða ein natúrligur partur av skipanini av Dalinum Langa sum heild. Sí uppskotið í skjalinum, *Ætlan fyri Runsival*, j.nr. 21/04955-2

Føroya Tele hevur latið ein fyrispurning inn um at fáa eitt øki at gróðurseta. Umsitingin hevur havt fund við Føroya Tele um teirra fyrispurning, og hevur umsitingin víst á møguleikan fyri einum samstarvi við gróðurseting í Dalinum Langa. Økið liggur beint aftan fyri høvuðssætið hjá Føroya Tele, og tí er hetta ein uppløgd staðseting. Føroya Tele vísti stóran áhuga fyri hesum samstarvinum. Sí fundarfrásøgn í skjalinum, *Fundarfrásøgn 08.03.22*, j.nr. 22/01089-2

Arbeitt verður í løtuni við at gera eitt røktarheim á Stórubrekku, og ætlanin er, at ein partur av matriklinum hjá røktarheiminum skal vera verandi partur av fríøkinum og skal skipast við í ætlanina fyri náttúruøkið í Dalinum Langa.

Fyri at økið skal vera gott og væl skipað, soleiðis at allir teir ymisku brúkarabólkarnir fáa gagnnýtt økið, er tørvur á fyrst at gera eina skipan av øllum økinum. Síðani kann farast undir at gera partar av átøkunum, sum ynski er um at fara í holt við.

Umsitingin ynskir tí at skipa økið fyrst og síðani leggja málið aftur fyri nevnd í mai við einum skipanaruppskoti og eini átaksætlan.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu í økispartinum D1.

Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/04955 Eigarafelagið Hoyvíkshædd: Umsókn um stuðul til verkætlanina Runsival á Hoyvíkshædd matr. Nr. 135fe, Hoyvík – spæliplláss Hoyvíkshædd
22/01089 Fyrispurningur um samstarv um gróðurseting frá Føroya Tele
17/03196 Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Ætlan við Runsival.jpg*, journal nr. 21/04955-2
*Fundarfrásøgn 08.03.22*, journal nr. 22/01089-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | x | x |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at heimila umsitingini at bjóða út gerð av ætlan fyri náttúruøkið og trivnaðarøkið í Hoyvík til veitarar innan lendisarkitektur, ið fáa eina samsýning á 20.000 kr. hvør.
- at fíggja 100.000 kr. til endamálið av rakstrarkarminum fyri 2022 á kt. 6210.
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Føroya Tele um eina ítøkiliga samstarvsavtalu um gróðurseting í økinum at leggja fyri nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Avmarkað útboð upp á heildarveiting av náttúruøkinum í Dalinum langa hevur verið. Fýra veitarar vórðu bodnir við í útboðið, og lótu allir veitararnir inn nøktandi tilfar. Sí útbjóðingartilfarið í skjal, j.nr. 22/01129-3 útbjóðingarskriv.

Teir fýra veitarnir eru:
- Hjálpirót, sí tilfar í skjal, j.nr. 22/01129-9 Uppskot til Náttúruøki í Dalinum Langa
- Havin, sí tilfar í skjal, j.nr. 22/01129-7 Frílendisætlan fyri Dalin Langa A3
- Urtagarðstænastan, sí tilfar í skjal, j.nr. 22/01129-8 Náttúruøki í Dalinum Langa PDF Tilboð
- Grønt og Grátt, sí tilfar í skjal, j.nr. 22/01129-6 náttúruøki Dalurin Langi

Heildarveitingin innibar at gera eina ætlan fyri náttúruøkið og geva eitt tilboð upp á arbeiðið at fremja ætlanina. Umsitingin gjøgnumgongur tilboðini og kostnaðin á fundinum.

Umsitingin hevur mett um innkomnu tilboðini út frá hesum metingarstøðunum.
- Góð skipan av økinum sum heild
- Kappingarførur prísur
- Góðska av tilfari sum verður nýtt
- Gjøgnumførd plantusamanseting

Metingarstøðini eru vektaði eins nógv (25% hvørt av teimum).

Øll uppskotini vóru góð og hava áhugaverdar tættir. Samanlagt verður mett, at uppskotini kundu havt meiri planting av trøum, soleiðis at dalurin í pørtum fer at kennast meiri sum ein viðarlund.

Niðurstøðan frá metingini er, at Urtagarðstænastan samanlagt hevur besta tilboðið. Tilboðið er áljóðandi kr. 5.390.618 u/mvg.

Av tí at tað er ynskiligt at tillaga verkætlanina nakað, eitt nú at planta fleiri plantur/trø/runnar, og gera fleiri gøtur, so verður mett, at handverkaraútreiðslurnar verða nakað hægri at fremja verkætlanina, enn tilboðið ljóðar uppá. Harumframt skal ymiskt annað, so sum ókendar útreiðslur, umsiting, hátíðarhald osfr. leggjast afturat hesum kostnaðinum. Mett verður tí, at tørvur er á eini játtan á kr. 6,9 mió kr íroknað mvg.

Hartil er at nevna, at endaliga avtalan um samstarv við Føroya Tele enn ikki er avgreidd. Fundur verður við Føroya Tele 13. okt, aftaná at skráin til byggi- og býarskipanarnevndarfundin verður send út. Kunnað verður nærri um niðurstøðu frá fundinum við Føroya Tele á fundinum í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Skjøl**
Útbjóðingarskriv j.nr. 22/01129-3
Tilboð Grønt og Grátt: j.nr. 22/01129-6 Náttúruøki Dalurin Langi
Tilboð Havin: j.nr. 22/01129-7 Frílendisætlan fyri Dalin Langa A3
Tilboð Urtagarðstænastan: j.nr. 22/01129-8 Náttúruøki í Dalinum Langa PDF Tilboð
Tilboð Hjálpirót: j.nr. 22/01129-9 Uppskot til Náttúruøki í Dalinum Langa

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:
- Heimila umsitingini at fara í samráðingar við Urtagarðstænastuna um at tillaga verkætlanina við planting av fleiri trøum.
- Heimila umsitingini at gera sáttmála við vinnandi fyritøkuna, um samráðingarnar koma á mál.
- Nevndin ávísir fígging á 6,9 mió. kr til verkætlanina.
  Beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2022:** Samtykt at heimila umsitingini at fara í samráðingar við vinnandi um at tillaga verkætlanina til eina viðarlund, og um tað ikki ber á mál, so at fara í samráðingar við aðrar tilboðsveitarar, og at leggja málið aftur fyri nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur umrøtt við arbeiðstakaran, at ynski er at planta meira, og at gera fleiri gøtur. Arbeiðstakari er samstarvssinnaður at tillaga ætlanina smb. ynski kommununnar, herundir at broyta

plantuætlanina/samansetingina, soleiðis at tættari og hægri planting verður í ynsktu økjunum. *Sí skjal j.nr. 22/01129-18 planur tættari planting í ynsktum økjum*.
Í tilboðnum hevur arbeiðstakarin uml 47.000 plantur íroknaðar, so í fyrsta umfari verður farið undir at broyta plantusamansetingina, fyri síðani, so hvørt plantað verður, at meta um, hvussu nógv skal leggjast afturat fyri at fáa viðarlundakensluna meiri sjónliga.
Arbeiðstakarin vísir tó á, at botnurin í sjálvum dalinum er sera vátur, so ivasamt er, um trø fáast at vaksa í lægsta geiranum í dalinum. Mælt verður tí heldur til at planta tætt og høgt uppat gonguleiðini á báðum síðum, serliga niðan til Klingurstjørn. Loysnin verður eftirmett, so hvørt sum arbeiðið verður gjørt øki fyri øki. Umrøtt varð, at plantast kundi serliga tætt, har gøtur koma inn á Kirkjugarðsleiðina.

Spæliøkini verða skipað í samstarvi við Býarskipanardeildina, tá ið farið verður í gongd.
Harafturat er ætlanin at gera átak at betra um liviumstøðurnar hjá flogfenaði í økinum. Hugsað verður um møguleikan at gera ein hólm og planta, so dunnur fara at reiðrast í økinum.

Ætlanirnar um samstarvið við Føroya Tele og aðrar vinnuligar grannar varð somuleiðis umrøtt við arbeiðstakaran. Arbeiðstakarin er sinnaður at samstarva við hesi, soleiðis at tey kunnu luttaka í plantingini. Økið, sum Føroya Tele er áhugað í at planta, er øki L og øki O. Umsitingin setir seg í samband við onnur virki í grannalagnum, soleiðis at hesi eisini fáa høvi at luttaka í plantingini í Náttúruøkinum.
Kostnaðurin fyri økini, ið grannavirkini luttaka í, verður drigin frá sáttmálaupphæddini við arbeiðstakaran tá ið endaliga avtalan við grannavirkini er fingin í lag. Umsitingin ger avtalur við grannar og tillagar sáttmálaupphæddina við arbeiðstakara í mun til hesar.

**Skjøl:**
*j.nr. 22/01129-18 planur tættari planting í ynsktum økjum.*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:
- Nevndin ávísir fígging á 6,0 mió. kr til verkætlanina.
- Tá fíggingin er tøk, at heimila umsitingini at gera sáttmála við arbeiðstakara uppá tilboðsupphæddina 5.390.618 kr u/mvg.
- og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

## 295/22 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 57/22 | 22/00009-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 51/22 | 22/00009-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 87/22 | 22/00009-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 74/22 | 22/00009-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 116/22 | 22/00009-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 101/22 | 22/00009-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 138/22 | 22/00009-1 |
| 8 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 131/22 | 22/00009-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 176/22 | 22/00009-1 |
| 10 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 167/22 | 22/00009-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 215/22 | 22/00009-1 |
| 12 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 192/22 | 22/00009-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 243/22 | 22/00009-1 |
| 14 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 217/22 | 22/00009-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 269/22 | 22/00009-1 |
| 16 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 250/22 | 22/00009-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 290/22 | 22/00009-1 |
| 18 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 271/22 | 22/00009-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 320/22 | 22/00009-1 |
| 20 Fíggjarnevndin | 15.12.2022 | 327/22 | 22/00009-1 |
| 21 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 295/22 | 22/00009-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni og juli verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri november verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Framlagt og góðkent.

## 296/22 Ásetan av fundardøgnum fyri býráðið 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 296/22 | 22/06833-1 |

**Málslýsing**
Uppskot frá umsitingini til fundardagar 2023 kl. 16:00 í býráðssalinum.

26. januar
23. februar
23. mars
27. apríl
25. mai
21. juni
28. september
26. oktober
23. november
14. desember

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

# 297/22 Avtalu millum Kommunalu Brennistøðina á Hjalla (KB) og Fjarhitafelagið (FHF)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 225/22 | 22/02807-2 |
| 2 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 209/22 | 22/02807-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.12.2022 | 325/22 | 22/02807-2 |
| 4 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 297/22 | 22/02807-2 |

**Upprunin til málið**
Í 1999 varð samstarvsavtala gjørd millum Kommunalu Brennistøðina (KB) og P/F Fjarhitafelagið (FHF), har avlopshiti frá KB verður latin FHF.

**Lýsing av málinum**
Fyri at fáa staðfest at fjarhitin er ein grøn orkukelda, er neyðugt at fáa nágreinað avtaluna millum KB og FHF - soleiðis at orkan, sum kemur fáa KB til FHF, verður at meta sum avlopsorka.

Fyrisitingin mælir til at ískoyti verður lagt aftrat verðandi sáttmálað sum er orðað í skjalið nr 22/02807-4 - Nágreining av avtalu millum KB og FHF – undirskriva.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
**Skjøl**
22/02807-3 - Nágreining av avtalu millum KB og FHF - undirskrivað
22/02807-3 - Forsíða - Samstarvsavtala millum KB og FHF
22/02807-4 - Samstarvsavtala millum KB og FHF - j.nr. 19991546
22/02807-5 - CO2 emission factor for waste incineration

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til at samtykt verður at leggja ískoyti aftrat verðandi sáttmálað sum er orðað í skjalið nr 22/02807-4

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.ø

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verandi samstarvsavtala millum Tórshavnar kommunu og Fjarhitafelagið kom í gildi
1. juli 1999 og kundi sigast upp við 12 mánaðarfreist til tann 1. í einum mánaði, tí í fyrsta lagi tann 1. juli 2004.

Fjarhitafelagið heitir á Tórshavnar kommunu um at leingja sáttmálan til 1. desember 2042.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjóri mæla til at leingja samstarvsavtaluna annars óbroytta til 1. desember 2042

**Fíggjarnevndin 15. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 17:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Annika Olsen | Súsanna Olsen |
| | Kristian Martin Skála | |